

# FORKANNING UM VITLÍKI

3. mars 2026

*At gagnnýta vitlíki við ábyrgd og soleiðis styrkja fólkið, málið og búskapin.*

GJALDSTOVAN

# Innihald

Samandráttur ........................................ 2
1. Bakgrund og endamál ........................................ 3
2. Visjón ........................................ 5
3. Støðan í Føroyum ........................................ 7
4. Altjóða samanbering ........................................ 11
5. Møgulig átøk í heildarætlanini ........................................ 14
6. Næstu stig ........................................ 17
7. Niðurstøða ........................................ 19
8. Forkanningin í frásjón ........................................ 20
Fylgiskjal 1. Samanumtøkur frá verkstovum ........................................ 23
Fylgiskjal 2. Altjóða samanbering ........................................ 30
Fylgiskjal 3. Átakslisti ........................................ 36

# Samandráttur

Hvussu kann vitlíki verða við til at økja um framleidni, stimbra nýskapan og vaksa um kappingarføri, og samstundis tæna samfelagnum at standa ímóti haldførisavbjóðingum og einum máli og mentan, sum eru undir støðugum trýsti?

Hesar spurningar hevur landsstýrið sett sær fyri at svara í einari heildarætlan fyri vitlíki.

Í grannalondum okkara er vitlíki vorðið eitt týðandi amboð at framtíðartryggja samfelagið. Felags fyri hesi lond er, at tey hava gjørt landsfevnandi heildarætlanir, sum seta út í kortið felags kós fyri vitlíki fyri alla tjóðina. Vitlíki skal verða við til at loysa stóru avbjóðingarnar og samstundis verja rættindi og tryggja etikk og mál. Málini, ið verða sett, eru stórætlað. Í Estlandi er málið, at vitlíki skal føra til ein vøkstur í bruttotjóðarúrtøkuni (BTÚ) upp á 50% innan 10 ár, meðan eitt mál, Danmark hevur sett sær, er, at vitlíki skal loysa arbeiðsmegi í almenna geiranum svarandi til 30.000 ársverk innan næstu 10 árini.

Henda forkanning er fyrsta stig í at gera eina heildarætlan fyri vitlíki í Føroyum.

Samanumtikið eru niðurstøðurnar í forkanningini, at føroyska samfelagið er komið stutt í mun til gagnnýtslu av vitlíki, og at vit eru eftirbátar í mun til okkara grannalond. Flestu av teimum, sum luttóku í forkanningini, síggja stórar møguleikar og hava ein vilja at brúka vitlíki, men himprast serliga av løgfrøðiligum óvissum, og tí at búningarstig og førleikar vanta. Tað verður eisini mett sum ein stór forðing í gagnnýtsluni av vitlíki, at føroyskt í alt ov lítlan mun kann brúkast í vitlíkisamboðum. Harafturat vístu luttakararnir á, at tað vantar ein greið støðutakan og ætlan fyri egið tøkniligt undirstøðukervi fyri vitlíki, herundir einum samstarvi millum vinnu og tað almenna um hetta økið.

Hinvegin er metingin, at vit, orsakað av okkara væl menta talgilda undirstøðukervi og okkara stødd, lutfalsliga skjótt kunnu flyta okkum fram á leið. Hetta fer tó krevja at djarvar strategiskar avgerðir.

Forkanningin hevur hesi ítøkilig tilmæli, sum eigur at verða farið í gongd við:

- Fyrsta og mest átrokandi stigið er at **fullfíggja heildarætlanina fyri vitlíki** við greiðum átøkum og tíðarætlan fyri næstu árini. Arbeiðið at fullfíggja heildarætlanina skal verða rótfest í øllum geirum og í politisku skipanini. Lagt verður upp til at fara undir heildarætlanina beint eftir at forkanningin er handað, so stígur ikki kemur í arbeiðið. Mælt verður til, at heildarætlanin er liðug í nóg góðari tíð til, at hon kann gerast partur av fíggjarlógararbeiðinum fyri 2027, og at heildarætlanin síðan verður grundað á verklagslóg fyri vitlíki.
- Í øðrum lagi skal **gongd setast á royndarverkætlanir** á stovnum og kommunum, so royndir, vitan og førleikar kunnu fáast til vega og deilast millum áhugapartar. Talan skal verða um royndarverkætlanir, har stórir møguleikar eru fyri at effektivisera ella betra um mannagongdir, t.d. við sjálvvirkandi skjalfesting og málsviðgerð.
- Í triðja lagi skal skipast ein **vitlíkiseind**, sum stendur fyri at samskipa landsins nýtslu av vitlíki og at fremja felags átøk tvørtur um allar geirar. Vitlíkiseindin eigur at verða skipað undir verandi stovni, skal virka tvørtur um land og kommunur og hava eitt tætt samstarv við vinnuna. Vitlíkiseindin skal hava til uppgávu at seta felags kós og dríva framdráttin av felags átøkum.

Umframt hesi tilmæli hevur forkanningin staðfest tilmæli at taka við í sjálva heildarætlanina. Hesi verða viðgjørd undir yvirskriftini ‘Møgulig átøk í heildarætlanini’.

# 1. Bakgrund og endamál

Henda frágreiðing lýsir úrslitini av forkanningini um vitlíki fyri Føroyar.

Í sambandi við at vitlíki í fjør gjørdist málsøki hjá Fíggjarmálaráðnum, hevur stjórnarráðið, í samráð við Gjaldstovuna, sum hevur fingið málsøkið at útinna, tikið stig til hesa forkanning.

Leisturin byggir á royndirnar við *Talgildu Føroyum*, har fyrsta stigið til heildarætlanina eisini var ein forkanning, og har tætt samstarv og samskapan millum allar týðandi samfelagsgeirar var lykilin til eina væleydnaða talgilding. Við hesum leisti tryggja vit einsháttaðar tænastur fyri stovnar, kommunur og borgarar, uttan mun til, hvar í landinum ella í umsitingini talan er um.

Arbeiðið tekur støði í nýggjastu heildarætlanini fyri talgilding av samfelagnum, *"Talgilding av samfelagnum heldur fram - 2025-2027"*, sum Løgtingið samtykti við verklagslóg á vári 2025.

Í **Átaki 15** í heildarætlanini fyri talgilding av samfelagnum hevur landsstýrið sett sær sum mál at:

*Leggja eina heildarætlan fyri vitlíki, sum skal seta út í kortið hvussu samfelagið fær sum mest burturúr tøknini, og hvussu vit verja okkum sum frægast fyri váðunum.*

Arbeiðssetningurin fyri forkanningina var, at orða eina **visjón**, sum kann skapa eina greiða felags kós fyri, hvussu landið skal nýta og gagnnýta vitlíki, og at **vera grundarlag fyri eini heildarætlan** fyri alt samfelagið.

Grundarlagið varð fingið til vega við at fáa innlit í, hvar føroyska samfelagið er statt í mun til vitlíki, og við at fáa vitan og íblástur úr grannalondum, um hvørjar ætlanir tey hava, og hvørji átøk tey hava roynt í verki.

Forkanningin var skipað við verkstovum, samrøðum, greiningum og skrivligum tilfari. Arbeiðið er framt í tíðarskeiðinum oktober 2025 til og við februar 2026.

Forkanningin er evnað til av einum verkætlanarbólki, mannaður við ráðgevum frá fyritøkunum Usable og Vitlíkisstovuni, og við fakfólki frá Gjaldstovuni. Jaspur Højgaard frá Usable hevur verið verkætlanarleiðari, og umframt hann hava Ólavur Ellefsen frá Usable, Gunnleygur Clementsen frá Vitlíkisstovuni, og Hóri Ranason, Halgir Winther Nagata og Nicolai Balle frá Gjaldstovuni verið í verkætlanarbólkinum.

Omanfyri verkætlanarbólkin hevur verið ein stýrisbólkur, og í honum hava verið Bjørgfríð Ludvig, aðalstjóri í Almanna- og heilsumálaráðnum, Bjarni Askham Bjarnason, aðalstjóri í Fíggjarmálaráðnum, og Leif Abrahamsen, stjóri á Føroya Gjaldstovu.

Hesin bygnaður er lýstur nærri á myndini á næstu síðu:


Stýrisbólkur, Fíggjarmálaráðið, Gjaldstovan og Heilsumálaráðið
Landsstýrið
Gjaldstovan, stjórn
Verkætlanarleiðsla
Verkstovur
Altjóða samstarv
Greining
Visión
Tilmæli
Frágreiðing og framløga

# 2. Visjón

Verkætlanarbólkurin hevur arbeitt við ymsum orðingum um visjón og er, nú forkanningin er komin at enda, komin við hesum uppskotinum:

*Føroyar skulu vera eitt undangonguland, ið vísir, hvussu eitt lítið samfelag við ábyrgd gagnnýtir vitlíki til at styrkja sítt fólk, sítt mál og sín búskap.*

Uppskotið er grundað á, at vit ikki bert skulu fylgja rákunum hjá øðrum, men sjálvi ganga á odda og vísa, hvussu okkara smidleiki og sterka samfelagskensla kunnu nýtast sum strategiskur fyrimunur. Við at gera føroyskt til eitt livandi og virkið mál í vitlíkisøldini, tryggja vit okkara mentanarliga sjálvræði, samstundis sum vit brúka tøknina til at styrkja vinnulívið og skapa munadyggar almennar tænastur, ið veruliga tæna øllum borgarum. Málið er at vísa heiminum, at eitt lítið, tætt knýtt samfelag sum okkara kann flyta seg skjótari og røkka longur, tá vit gagnnýta vitlíki ábyrgdarfult, opið og eftir okkara egnu treytum.

## Stuðlandi súlur

Tá farið var undir forkanningina, vóru sjey súlur undir visjónini eyðmerktar.



Tær eru:

- **Føroyskt fyrst og fremst**: Vitlíki skal kunna brúkast á føroyskum, og endurspegla okkara mentanarligu virðir og samleika.
- **Etikkur og moralur í hásæti**: Vitlíki skal vera í samsvar við føroyskar normar, skal verða brúkt ábyrgdarfult, vísa virðing, verða inkluderandi, rúma ymiskleika og gjøgnumskygni.
- **Fatan og førleikar á høgum stigi**: Breið fatan skal vera um vitlíki tvørtur um ættarlið, og førleikar at standa fyri og menna vitlíki skulu verða á høgum stigi.
- **Munadyggur almennur geiri**: Vitlíki skal vera við til at nútímansgera almenna geiran, herundir økja um framleidni og virkisføri, og vera grundarlag fyri betri avgerðum og veita borgarum betri, skjótari og rættari tænastur.
- **Kappingarfør vinna**: Vinnan skal hava vitlíkiskarmar og -undirstøðukervi at virka undir, sum stuðla undir nýskapan, vøkstri og kappingarføri hjá vinnuni.
- **Tøkniligt undirstøðukervi**: Ætlan og verkseting av tryggum og mótstøðuførum tøkniligum undirstøðukervi skal fremjast. Harumframt skulu vit menna føroyskan málbanka til stórar málmyndlar.
- **Rættindi skulu virðast og lógir skulu verða klárar til vitlíki**: Upphavsrættindi til skapandi verk skulu virðast og lógar- og regluverk skal fylgja við nýggju tøknini.

Forkanningin er í stóran mun skipað kring hesar sjey súlurnar.

# 3. Støðan í Føroyum

Verkstovurnar hava verið ein sera avgerandi partur av arbeiðinum í forkanningini. Stuðlandi súlurnar í visjónini vóru tema fyri, hvørji evni vórðu viðgjørd í verkstovunum. Heitini og raðfylgjan á verkstovunum var:

1. Kappingarfør vinna
2. Føroyskt fyrst og fremst
3. Etikkur og moralur í hásæti
4. Fatan og førleikar
5. Munadyggur almennur geiri
6. Tøkniligt undirstøðukervi.

Eingin verkstova varð í hesum umfari um sjeyndu súluna “Rættindi og lógir”. Stutta skotbráið gjørdi, at verkætlanin raðfesti at lýsa hini økini og staðfesta tørvir, sum síðan kunnu lýsast nærri til heildarætlanina. Tað var eisini greitt tíðliga í tilgongdini, at rættindi og lógir skuldu lýsast, aftaná at hini økini vórðu lýst. Tískil er náttúrligt, at hetta fyllir meir, tá ið arbeiðið við heildarætlanini verður gjørt.




Ein meginregla fyri arbeiðið var samskapan við áhugapørtum, og her vóru verkstovurnar ein umráðandi partur. Verkstovurnar vórðu tískil skipaðar sum samskapandi verkstovur, har luttakararnir vórðu hoyrdir fyri at skilja núverandi støðu og ynski.

Núverandi støða verður lýst her, og er lýst frá verkstovunum, sum vóru hildnar og øðrum tilfari, ið varð fingið til høldar í verkætlanini. Samanumtøkur frá serstøku verkstovunum eru í Fylgiskjali 1 Samanumtøkur frá verkstovum.

## Óvissur um nýtslu

Forkanningin vísir eina greiða mynd av, at áhugin fyri at nýta vitlíki er stórur, og mong síggja stórar møguleikar. Støðan í Føroyum er tó framvegis merkt av smáum og spjaddum royndum og kensluni av at vera aftanfyri. Tað er ikki viljin, ið manglar, men hinvegin karmarnir, sum gera tað lætt at fara í gongd á ein tryggan hátt.

Forðingin, sum oftast gongur aftur, er óvissan um reglur, ábyrgd og serliga handfaring av persónsupplýsingum. Hetta sæst bæði í almenna geiranum og í vinnuni. Á verkstovuni “munadyggur almennur geiri” var óvissan serliga stór og tí vóru heldur ikki nógv dømi um nýtslu av vitlíki í almenna

geiranum. Støðan var heldur frægari fyri vinnuna, hóast mett var, at tey heldur ikki vóru komin serliga langt. Avleiðingin er, at mong eru afturhaldandi av ótta og óvissum, meðan onnur royna seg fram uttan greiðar leiðreglur. Luttakarar á verkstovunum vístu tí á ein greiðan tørv á felags góðkendum arbeiðsmynstrum og standardiseraðum politikkum, heldur enn at hvør stovnur og hvør fyritøka mugu finna sínar egnu loysnir. Somuleiðis varð sóknast eftir eini miðsavnaðari eind, sum kann veita ráðgeving og stuðul, til at fara trygt og væl undir at brúka vitlíki.

Av tí at trygg almenn amboð vanta í dag, fara starvsfólk at brúka ókeypis, ikki góðkend amboð á netinum, eisini nevnt skuggavitlíki. Ein váði er, at starvsfólk lata viðkvæmar dátur inn í hesi amboð, sum ger, at vit missa ræðið á dátum okkara. Dømi eru longu um hetta, og staðfestir hetta tørvin lýstan omanfyri, og hvussu átrokandi tað er.

## Álitandi tænastur

Á verkstovuni um etikk og ábyrgd var eisini týðuligt, at álit frá borgarunum er ein fortreyt fyri, at vitlíki kann verða brúkt í almennum tænastum. Serliga vórðu tvey krøv endurtikin:

- Vitlíki má ikki koma í staðin fyri neyðuga menniskjaliga samveru
- Gjøgnumskygnið má vera so gott, at borgarin veit, nær samskift verður við eina maskinu.

Samstundis varð víst á, at greiðar leiðreglur og karmar vanta í dag, og at verandi ráð og nevndir ikki eru nóg væl fakliga ílatin til at handfara tær serligu avbjóðingar, sum vitlíki hevur við sær.

## Vantandi fatan og førleikar

Viðvíkjandi fatan og førleikum varð staðfest í næstan øllum verkstovum, at tørvurin er sera stórur, og mett var at fatan kemur áðrenn førleikar. Her snýr tað seg ikki bara um at duga at forrita, men um, at leiðarar, starvsfólk og borgarar fáa eina betri fatan av, hvat vitlíki er, hvat tað er egnað til, og hvussu ein arbeiðir trygt við dátu-, dygdar- og ábyrgdarspurningum. Serliga í almenna geiranum varð víst á, at fatan og førleikar var ein stór forðing at koma í gongd við at brúka vitlíki. Eisini undirvísingarøkið er undir trýsti og hevur tørv á greiðari vegleiðing, so at vitlíki kann verða brúkt skilagott og ikki bert verða sæð sum ein trupulleiki.

Forkanningin staðfestir eisini, at tørvur er á nýggjum førleikum, á ymiskum stigum og hjá ymiskum bólkum. Leiðarar og avgerðartakarar hava annan tørv enn tey starvsfólk, ið veita tænasturnar, og tey, sum skulu byggja og reka vitlíkisskipanir, hava uppaftur ein annan tørv. Tað er tørvur á vitlíkisførleikum á mongum ymsum økjum, og teir vanta í dag.

## Vitlíki á føroyskum

Føroyska málið varð lýst sum eitt av teimum mest átrokandi økjunum. Á verkstovuni um málið stúrdu luttakararnir fyri, at málsligi samanhangurin viknar, serliga millum tey ungu. At nýggjastu vitlíkistøknin ikki rigga nóg væl á føroyskum fer at gera hesa støðu enn meira álvarsama. Hetta gevur longu avbjóðingar í skúlunum, og tað kann eisini hava ta avleiðing, at samskiftið við telduna í arbeiðshøpi spakuliga flytur seg enn meir yvir í onnur mál, um vitlíkisamboðini framhaldandi rigga munandi verri á føroyskum enn øðrum málum. Boðskapurin var samstundis, at møguleikarnir eru stórir, men at

hetta krevur strategiskar íløgur, samskipan og greiðar avtalur um dátur og rættindi, íroknað rímiliga samsýning, so at føroyskt gerst veruliga brúkiligt í tí broytandi talgilda heiminum.

Tá ið talan er um at føroyska vitlíki, so eru tað ábendingar um, at hetta kann fáast gott á føroyskum. Um vit í Føroyum skulu hava ræðið á, hvønn veg hetta mennist, og ikki bert tøknirisarnir, er avgerandi, at vit í Føroyum savna eina stóra mongd av føroyskum dátum. Nakað av góðum arbeiði er gjørt innan hetta økið, millum annað Ravnur verkætlanin, sum byggjast kann víðari á. Dømi um eitt átak, sum arbeiðir við hesari avbjóðing, er eitt netverk av almennum stovnum og fyritøkum, sum samstarva um at savna dátur sum trygt og lógliga kunnu brúkast til at stuðla undir føroyskum í málmyndlum. Onnur átøk eru eisini gjørd í mun til talu-til-tekst og teldutalu. Máltøknidepilin á Fróðskaparsetrinum er ein ógvuliga umráðandi leikari í hesum arbeiðum, men fleiri átøk vera eisini rikin privat. Ein heildarætlan hevði gagnað slíkum átøkum og amboðum, við raðfesting og yvirskipaðari samskipan.

## Savnan av dátum

Staðfestast kann, at føroyskar dátur er partur av okkara undirstøðukervi. Tí er tað umráðandi, at vit, eins og í grannalondum okkara, raðfesta og fíggja arbeiðið at savna dátur. Henda íløga kann gerast ein lykil til stórar sparingar. Gott føroyskt mál í vitlíki er ein fyritreyt fyri, at vit kunnu brúka vitlíki breitt í almenna geiranum. Um vit ikki gera hesa íløguna nú, kann tað hava fylgir antin fyri nyttuna, sum vitlíki kann geva, ella um føroyska málinum skal vera lív lagað yvirhøvur.

Á verkstovuni um vinnuna kom eisini fram, at atgongdin til almennar dátur kennist "læst", og at hetta avmarkar møguleikarnar at skapa virði og nýskapan. Tørvur er á, at tað almenna hevur ein hugburð, at dátur sum útgangsstøði eru atkomuligar. Føroyar hava longu eitt trygt talgilt undirstøðukervi til at deila dátur umvegis Heldina. Heldin er ein tøkni, ið ger tað munandi lættari og tryggari at deila viðkvæmar dátur millum stovnar, og tað er júst hetta, tørvur er á, um vit skulu fáa sum mest burtur úr vitlíki í tí almenna.

Dátutrupulleikar eru tó ikki altíð tøkniligir trupulleikar, men kann eisini standast av at vera alt ov varin. Veruleikin er tann, at nógvar dátur ikki eru viðkvæmar, og tí eiga tær sum útgangsstøði at vera tøkar hjá øllum.

Verandi lóggáva er ein avbjóðing, sum eisini er staðfest á millum annað ES-stigi og í Estlandi. Her verður hugt eftir hvussu lógir og tøkni í størri mun kunnu fylgjast at.

## Tøkniligt undirstøðukervi

Verkstovan um tøkniligt undirstøðukervi avdúkaði, at Føroyar hava nærum onga alment atkomuliga vitlíkisrokniorku, og marknaðurin er lamin av aftran. Veitarar aftra seg við at gera stórar íløgur uttan ein greiðan eftirspurning og strategi. Skotið verður tí upp at kanna eina loysn, har tað almenna kann geva marknaðinum eitt greitt tekin við at virka sum ein 'akkerskundi', so íløguváðin minkar, og føroyskur førleiki verður stimbraður.

Trot á føroyskum tøkniligum undirstøðukervi ger Føroyar sera viðbreknar, jú meir vitlíki verður brúkt. Um vit gerast fult og heilt bundin at útlendskum veitarum, er vandi fyri, at vit missa okkara rakstrarførleikar, um vit missa sambandið við umheimin.

Samstundis varð dentur lagdur á, at tøkniligt undirstøðukervi snýr seg um strategiska trygd, heldur enn fullkomið sjálvbjargni. Vit skulu hava lokalan kapasitet til samfelagskritiskar tænastur, men samstundis gagnnýta altjóða loysnir, har tað gevur meining.

So hvørt sum vitlíki verður meira brúkt, stinga aðrir váðar seg eisini upp innan trygd. Skipanir, ið viðgera viðkvæmar dátur, kunnu vera útsettar fyri nýggjum slagi av álopum. Tí er umráðandi, at hugsa um teldutrygd í vitlíkisverkætlanum frá byrjan.

Vitlíkisskipanir, og serliga tær sum brúka stóru málmyndlarnar, kunnu skjótt hava tørv á nógvari rokniorku. Hetta er viðurskifti at hava í huga, tá ið støða skal takast til undirstøðukervi, bæði tá ið hugt verður eftir at útbyggja staðbundnan kapasitet, herundir orkuveiting, og tá ið farið verður undir altjóða samstarv. Heildarætlanin eigur tí at viðgera hetta økið nærri. Serliga kann ein greining av, hvør nýtslan kemur at vera, geva okkum eina greiðari mynd av hesum.

# Samanumtøka

Samanumtikið peika eygleiðingarnar á, at vitlíki er ikki bert ein tøknilig uppgáva, men eisini ein spurningur um kós, álit og talgilt sjálvræði. Viljin og hugskotini eru til staðar, men uttan miðsavnaða leiðslu, felags karmar, ítøkiligar arbeiðshættir og fígging, verður framdrátturin lítil og ójavnur. Í staðin er vandi fyri bæði ótryggari nýtslu, og at onnur mál stigvíst verða meira brúkt í samfelagnum.

# 4. Altjóða samanbering

Tað er avgerandi fyri eina føroyska vitlíkisætlan, at vit hyggja út um landoddarnar. Vit eru ikki einsamøll um hesar avbjóðingarnar, og londini kring okkum hava longu tikið stig til, hvussu tey velja at taka ímóti hesum avbjóðingum.

Serliga eru tað fýra høvuðsøki, har verkætlanin hevur fingið íblástur:

- **Føroyska málið:** Sum staðfest á verkstovunum, er føroyska málið ein avbjóðing í mun til vitlíki. Avbjóðingin snýr seg serliga um lítlu mongdina av dátum, og her mugu vit síggja, hvussu onnur smámál hava loyst hetta.
- **Verksetan:** Hvussu verður farið frá ætlan til veruleika? Vit mugu skilja, hvussu onnur lond hava megnað at flutt seg frá strategiskum skjølum til ítøkilig átøk, sum skapa virði.
- **Tøkniligt undirstøðukervi:** Ymisleikin í vitlíkisuppgávum ger, at tað er neyðugt at skilja, hvat skal byggjast í Føroyum fyri at tryggja sjálvræði, og hvat kann loysast í altjóða samstarvi.
- **Heildarætlanir:** Grannalond okkara hava arbeitt leingi við heildarætlanum, og hava nýliga dagført sínar heildarætlanir. Tær geva okkum eina mynd av, hvussu vit kunnu raðfesta rætt í Føroyum.

Hesi fýra økini eru lýst í Fylgiskjal 2 Altjóða samanbering. Niðanfyri er ein samanumtøka av altjóða greiningini.




Tá hugt verður eftir smáum málum, og teirra støðu í tøkni, so hugdi verkætlanin serliga til Íslands. Ísland er í líknandi støðu sum Føroyar, men hevur við miðvísum arbeiði megnað at gera íslendskt til ein virkandi part av nútíðar vitlíkisskipanum. Avgerandi í íslendsku tilgongdini er Almannarómur, sum arbeiðir fyri at fremja íslendskt í nýggjastu tøknini.

Ein eygleiðing úr Íslandi er, at tá ið fyrireikingararbeiðið er væl úr hondum greitt, sum tað er í Íslandi, so er eisini gjørligt at fáa tøknirisar á tal, og at fáa teir at stuðla undir smáum málum. Hetta sæst í samstarvinum, sum Ísland hevði við OpenAI, har Ísland tíðliga gjørdist ein samstarvsfelagi. Tað, sum vit kunnu staðfesta er, at góð fyrireiking letur dyr upp, og vit eiga at læra frá teimum og seta ferð á hesi átøk her heima.

Dátusavnan er ein avgerandi partur at styrkja føroyska málið í tøkni. Her varð hugt at Noregi fyri at fáa íblástur. Hetta varð gjørt ígjøgnum vitlíkisnetverkið, sum arbeiðir við at seta á stovn dátubankar. Eftir framløgu frá norska tjóðbókasavninum, so eru tað ábendingar um, at leisturin í Noregi passar væl til, hvussu vit eru skipað í Føroyum. Vitlíkisnetverkið arbeiðir víðari við at lýsa, hvussu hetta kann gerast í Føroyum, og eigur arbeiðið við vitlíkisheildarætlan at halda seg dagført her.

Í mun til verksetan meir yvirskipað, so varð serliga hugt at Estlandi og Danmark. Tá ið upprunaliga varð farið undir Talgildu Føroyar, var Estland eitt land, sum stórur íblástur kom frá. Estland hevur síðan hildið fram við at menna seg talgilt og er eisini frammarlaga innan vitlíki. Tí var tað náttúrligt at hyggja at, hvussu Estland hevur arbeitt við vitlíki. Estland hevur savnað stóran part av sínum átøkum í eina miðsavnaða vitlíkiseind. Arbeiðið hjá estlendsku vitlíkiseindini hevur fevnt víða: At stovna røttu útbúgvingarnar, gransking, betra um førleikar, at fara undir royndarverkætlanir og onnur øki. Verkstovurnar góvu greiðar ábendingar um, at tað millum annað er tørvur á betri fatan og førleikum, og Estland hevur royndir hiðani og frá smærri verkætlanum. Hesar vísa at slíkar verkætlanir mugu vera í eini støðd, at tá ið tær eru lidnar, hevur íløgan verið somikið lítil, at tað ikki er eitt krav, at tað eydnast at føra arbeiðið víðari í eina størri verkætlan, men at lærdómurin hevur nóg mikið av virði í sjálvum sær, og tað er í lagi at steðga eftir at royndarverkætlanin er liðug. Estlendska tilgongdin vísir ein arbeiðshátt, sum byrjar í smáum og arbeiðir seg móti nøkrum størri, har tað vísir seg at loysa seg.

Í Danmark hava tey eitt skipað eitt úrvalslið (Task Force), og eru royndarverkætlanir eisini riknar av hesum toymi. Tó, so hevur Danmark nú flutt seg frá royndarverkætlanum til størri verkætlanir (storskala projekter). Teirra royndir við royndarverkætlanum eru, at hesar verkætlanir við tíðini missa virðið, og tað gerst meiri viðkomandi við størri verkætlanum. Tískil hava tey flutt seg til serliga tríggjar størri verkætlanir:

- **Sjálvvirkandi skjalfesting:** Nýtsla av talu-til-tekst fyri at minka um tíðina, sum heilsu- og umsorganarstarvsfólk brúka upp á at journalisera, so meira tíð verður til borgaran.
- **Talgildir hjálparar til borgarar og vinnu:** At fara frá statiskum sjálvgreiðslum til vitlíkisstýrdar hjálparar, sum kunnu veita betri og meira persónliga vegleiðing.
- **Avgerðarstuðul til starvsfólk:** At geva málsviðgerum amboð, sum kunnu stuðla í torgreiddum avgerðum og gera málsviðgerðina skjótari og betri.

Hetta eru dømi um verkætlanir, sum kundu verið sera áhugaverdar at gera í Føroyum. Afturboðanin frá danska úrvalsliðinum var eisini, at tey meta, at tað eru stig á búningarleiðini, sum Danmark hevur verið ígjøgnum, sum vit í Føroyum kunnu leypa um og soleiðis koma skjótari til góð úrslit við minni váða.

Samanumtikið í mun til verksetan, og at koma skjótt og væl frá landi í føroysku vitlíkistilgongdini, so kann staðfestast, at har er nógvur lærdómur at heinta í grannalondunum.

Í mun til tøkniligt undirstøðukervi, so vístu samrøður, at samstarv er vegurin fram. Eins og lýst í núverandi støðu, so er tað nakað av tøkniligum undirstøðukervi, sum má byggjast, men grannalond

okkara fáa eisini ein stóran part av neyðugu rokniorkuni í samstørvum. Eitt dømi um eitt slíkt samstarv sæst við LUMI í Finlandi. Tískil eiga vit at raðfesta samstarv, um tøkniligt undirstøðukervi, tíðliga í tilgongdini. Tað, sum krevst er, at Føroyar staðseta seg sum ein virknan luttakara í tí norðurlendska og evropeiska vitlíkisumhvørvinum - heldur enn at standa uttanfyri.

Eitt norðurlendskt samstarv er New Nordics AI, har eitt av átøkunum eisini setur sjóneykuna á, at brúka varandi orku til vitlíki.

Tá hugt verður at heildarætlanum, er greitt, at flestu grannalond okkara hava eina slíka. Hesar eru eisini dagførdar seinastu árini, og tað sæst eisini at vitlíki er sera ovarlaga á dagsskránni hjá ES. Hóast ymiskar, so fevna tær flestu av teimum um nøkulunda somu øki, sum eru viðgjørd í visjónini, sum er lýst omanfyri. Býtið av økjunum er ymiskt, men innihaldið líkist.

Hyggja vit aftur til Íslands, so er teirra ætlan skipað í fimm ábyrgdarøki:

- Vitlíki fyri øll
- Kappingarfør vinna
- Menning av útbúgving
- Nýggj tilgongd til almennar tænastur
- Heilsuverk fyri framtíðina.

Undir ábyrgdarøkjunum eru so millum 2 og 6 átøk við til samans 20 átøkum. Átøkini eru lýst við einum máli, hvat skal gerast, og hvat væntaða úrslitið er. Samstundis verður ein ábyrgdari settur á átakið og hvørjum samstarvað verður við. Ísland hevur valt at leggja hesa ábyrgd til aðalráðini. Tað er eisini ein møguleiki í Føroyum.

Heildarætlanirnar verða í størri mun gjørdar sum handlingsætlanir í dag. Íslendska dømið omanfyri er ein slík, og í USA hava tey eisini eina slíka. Munirnir í heildarætlanunum sæst aftur í, hvørji undirliggjandi virði mynda ætlanirnar. Hetta vísir, enn sum áður, at samstarv við grannalond okkara er umráðandi, tí at tað eru tey londini, sum líkjast okkum mest.

# 5. Møgulig átøk í heildarætlanini

Í arbeiðinum við forkanningini, eru nógv møgulig átøk komin undan kavi. Mong av hesum átøkum eru møguleikar, sum kunnu umhugsast í arbeiðinum við eini heildarætlan. Tó, so eru tey nevndu átøkini ikki bundin av eini heildarætlan, og kunnu tey, sum vara av økjunum, umhugsa hesi átøk longu í dag.

Hesi átøk spretta beinleiðis úr tí, sum áhugapartar hava víst á í verkstovunum, úr royndunum hjá okkara grannalondum, og úr teirri visjón og teimum súlum, sum vórðu settar út í kortið við byrjanina av arbeiðinum.

Møguligu átøkini, sum eru nevnd her, eru bert nøkur av mongum møguligum átøkum, og liggur ein meir umfatandi listi við møguleikum í "Fylgiskjal: Átakslisti". Hetta er ein innleiðandi listi, sum byggir á úrslit frá verkstovum. Listin kann verða brúktur sum útgangsstøði, men hann eigur eisini at verða endurskoðaður saman við áhugapørtunum, sum átøkini umfata, áðrenn farið verður víðari við ítøkiligum átøkum.

## Stovna eina vitlíkiseind

Bæði verkstovurnar og samskiftið við onnur lond hava staðfest, at tað er tørvur á eini samskipandi vitlíkiseind fyri at dríva heildarætlanina fram. Henda vitlíkiseind eigur at verða staðsett so, at hon kann fevna tvørtur um bæði land og kommunur. Ítøkiliga varð nevnt, at hon kundi ligið væl sum víðkan av virkseminum hjá Talgildu Føroyum. Ein slík eind hevði millum annað kunna arbeitt við at:

- seta felags kós og menna amboð og mannagongdir til nýtslu av vitlíki
- tryggja, at Føroyar læra í felag heldur enn hvør í sínum lagi
- seta í verk nýggjar verkætlanir og leiða tær frá byrjan til enda, har tað er viðkomandi
- virka sum akker fyri altjóða samstarv
- tryggja framdrátt og ábyrgd tvørtur um allar súlur í heildarætlanini.

Mælt verður til at Vitlíkiseindin, sum eitt tað fyrsta, eigur at skipa eitt úrvalslið, sum kann stuðla og hjálpa stovnum og kommunum, at koma í gongd og seta í verk royndarverkætlanir.

Ábendingar eru um, at ein slík eind eigur at byggja á tann samstarvsleist, vit kenna frá Talgildu Føroyum, og tryggja javnbjóðis umboðan frá bæði landi og kommunum við tøttum samstarvi við vinnuna.

Ítøkiliga, so kann ein slík eind byrja við einum fólki, sum leggur karmarnar fyri eindina og lýsir tørvirnar, sum eru fyri eini slíkari eind.

## Styrkja føroyska málið

Verkstovurnar vístu eisini greitt, at føroyska málið er undir stórum trýsti í vitlíkisøldini. Amboð við vitlíki verða brúkt í dag á fleiri økjum, og henda nýtslan fer at økjast framyvir. Tørvur er á at vitlíkisamboð fara at rigga munandi betur á føroyskum. Um ikki, so er tað ein váði fyri at onnur mál, serliga enskt, fara at verða brúkt enn meir framyvir. Henda nýtsla er alt frá skúla til arbeiði.

Eins og víst á, er lærdómurin frá m.a. íslendska Almannarómi, at tað er gjørligt at gera eitt arbeiði, sum betrar munandi um støðuna hjá málinum í tøkni. Ábendingarnar eru tó, at hetta krevur miðvíst arbeiði og størri fígging.

Møgulig átøk, sum hugsast kann um, eisini í arbeiði við heildarætlan á hesum øki, eru at:

- stuðla arbeiðinum at menna skipaða dátusavning av dygdargóðum føroyskum teksti við atliti til rættindahavarar
- styrkja arbeiðið við at føroyska vitlíki. Hetta er eitt øki, sum skapar grundarlag fyri brúksamboðum
- menna altjóða samstørv, eitt nú við at melda seg inn í norðurlendska málmyndla-netverkið undir New Nordics AI.

## Seta gongd á royndarverkætlanir - har sannlíkindi eru fyri framhaldi

Royndirnar úr Estlandi vísa virði í at byrja smátt við fokuseraðum royndarverkætlanum, læra av bæði eydnu og óeydnu, og byggja førleikar so líðandi. Danska tilgongdin við sokallaðum 'Storskala projekter' leggur dent á at savna tilfeingi um øki, har tøknin er roynd og virðið er prógvað.

Hetta gevur ábendingar um, at tað hevði gagnað Føroyum at sett gongd á eina røð av royndarverkætlanum. Royndarverkætlanir eiga at verða valdar, har tær hava stór sannlíkindi fyri at halda fram, skapa ítøkiligt virði og at kunna endurnýtast.

Slíkar royndarverkætlanir høvdu eisini verið nýttar til at minka um óvissurnar, sum staðfestar vórðu í verkstovunum. Hetta við at arbeiða ítøkiliga við teimum avbjóðingum, sum eru orsøk til óvissurnar. Umráðandi er, at royndirnar frá slíkum verkætlanum verða deildar í almenna geiranum.

Royndirnar í Estlandi eru eisini, at royndarverkætlanir ikki mugu gerast størri enn, at átakið kann steðga eftir verkætlanina. Best er, um íløgan kann vinnast beinleiðis aftur, men minstamálið má vera, at vitanin, sum fingin verður til vega, hevur nóg stórt virði í sjálvum sær.

Nakrar møguligar royndarverkætlanir vórðu staðfestar í innleiðandi samrøðum við áhugapartar, og kunnu tær síggjast í Fylgiskjali 3 Átakslisti. Hesin listin er, sum áður sagt, bert innleiðandi, og eiga áhugapartarnir at hoyrast, áðrenn farið verður víðari við ítøkiligum royndarverkætlanum.

## Menna vegleiðingartilfar og lyfta vitlíkisfatanina

Verkstovurnar vístu ferð eftir ferð, at ein av stóru forðingunum ikki er vantandi vilji, men vantandi fatan og førleikar um vitlíki, hvat tað kann og ikki kann, og hvat er loyvt sambært lóg. Hetta er ein felags ábyrgd hjá myndugleikum, vinnu og fakfeløgum.

Møgulig átøk, sum hugsast kunnu um í eini víðari tilgongd, eru at:

- menna felags leiðreglur fyri almennar stovnar, sum fevna um góðkend amboð, dátuhandfaring, krøv um menniskjasligt eftirlit og innkeypskrøv, umframt einfaldar vegleiðingar, sum beina burtur óvissuna
- stovna eina miðsavnaða stuðulsfunksjón - eitt navngivið stað, har starvsfólk og leiðarar kunnu fáa ráðgeving um ábyrgdarfulla nýtslu
- greina og lýsa, hvørjir serstakir vitlíkisførleikar eru neyðugir hjá ymiskum bólkum, so sum leiðarum, starvsfólki, serfrøðingum, undirvísarum og borgarum. Og síðan gera eina samskipaða

ætlan fyri at menna hesar førleikar í samstarvi við útbúgvingarstovnar, fakfeløg og aðrar viðkomandi partar
- styrkja ráð, so sum etiska ráðið, við yrkisføri um vitlíki, fyri at tryggja rætta umhugsni í verksetan av nýggju tøknini
- fylgja væl við í EU AI Act-kørmunum. Hóast Føroyar ikki eru í ES, so eru okkara veitarar, samstarvspartar og skipanir merkt av ES-reglum - vit mugu menna okkara egnu, einføldu mannagongdir, sum samsvara við hesi krøv.

## Stovna viðkomandi altjóða samstarv

Forkanningin hevur staðfest, at smá lond ikki byggja vitlíkisundirstøðukervi einsamøll - tey fáa atgongd gjøgnum røttu samstørvini.

Nakrir møguleikar, sum tað kann arbeiðast víðari við eru:

- At tryggja atgongd til felags norðurlendska rokniorku.
- At formliga luttaka í New Nordics AI, serliga viðvíkjandi samstarvi um málmyndlar.

# 6. Næstu stig

Um hildið verður fram við arbeiðinum at gera eina heildarætlan, verður mælt til hesi næstu stig. Stigini eru deild upp í trý øki:

- Samstarv
- Íblástur
- Verksetan

Neyvar dagfestingar eru ikki ásettar, tí nær farið verður í gongd við arbeiðið, er avgerandi fyri, nær ting kunnu henda. Metingin er tó, at um byrjað verður beinanvegin, er gjørligt at fáa eina heildarætlan klára innan 4 mánaðir.

Fortreytin fyri nógvum av tí, sum mett verður at vera næstu stig, er tó, at eisini verður farið í gongd við at stovna eina vitlíkiseind, sum kann føra arbeiðið víðari, tá ið ein heildarætlan er klár.

## Samstarv

Í forkanningini hevur verið arbeitt breitt og at fáa flest gjørligt til orðanna. Hetta eigur at halda fram, og fylgt eigur at vera upp við teimum, sum longu hava luttikið á verkstovum og víst áhuga fyri framhaldandi luttøku. Hetta er ein upplagdur møguleiki, sum arbeiðið við heildarætlanini eigur at kanna nærri.

Tað er umráðandi, at um heildarætlanin skal hava ítøkiligar verkætlanir ella átøk, sum eru uttanfyri málsøkið hjá Fíggjarmálaráðnum, so er tørvur á at tryggja strategiskt samstarv við teir áhugapartar, hvørs málsøki verða fevnd av hesum átøkum.

Eisini eigur at verða arbeitt víðari við at tryggja altjóða samstarv og rótfesta tey sambondini væl í Talgildu Føroyum. Eins og víst á, eru tað fleiri øki, har hetta er ein fortreyt.

At savna fólk enn meira breitt, enn tað hevur verið til verkstovurnar, hevur alla tíðina verið eitt mál. Ein slíkur møguleiki kundi verið, at havt ein arbeiðsdag um vitlíki, har nógv fólk vórðu boðin at luttaka. Hesum eigur arbeiðsbólkurin at arbeiða víðari við.

## Íblástur

Tað er vorðið sera greitt í forkanningini, at nógvur íblástur er at heinta frá grannalondunum. Fleiri av altjóða pørtunum, sum vit hava tosað við, hava nevnt møguleikan um eina vitjan. Sæð frá royndum, so er metingin, at í arbeiðinum við eini heildarætlan hevði hetta verið nakað, sum kundi givið stórt virði í mun til íblástur til, hvat er rætt at gera, og hvussu vit eiga at skipa hetta arbeiðið.

Arbeiðið víðari skal eisini halda fram við at fáa íblástur frá altjóða ráki. Við ferðini, sum økið flytur seg við í løtuni, er tað sera umráðandi at halda seg framhaldandi dagførdan við vitan. Umhugsast kann, um onkur ráðstevna kann geva íblástur her, men hetta kann metast um, tá ið arbeiðið verður byrjað.

# Verksetan

Arbeiðið við heildarætlan eigur at byrja við átakslistanum í fylgiskjalinum og at byggja víðari upp á hann saman við áhugapørtum, so viðkomandi royndarverkætlanir kunnu eyðmerkjast.

Til seinast, so eigur arbeiðið at taka tráðin upp og greina, hvussu stórur metti tørvurin á rokniorku er í mun til vitlíki framyvir, so gongd kann setast á arbeiðið at kanna prísir og byrja tilgongdina at útvega neyðugan vitlíkistól- og ritbúnað.

# 7. Niðurstøða

Samanumtikið hevur vitlíkisforkanningin staðfest, at tað valdar ein óvissa, sum ger, at bæði almennu og privatu geirarnir himprast við at brúka vitlíki. Samstundis síggja nærum øll stórar møguleikar við vitlíki og meta tað eisini vera átrokandi, at okkurt verður gjørt við støðuna.

Altjóða greiningar og samrøður góvu ábendingar um møgulig átøk. Verkstovur staðfestu, at tørvur er á líknandi átøkum í Føroyum sum hjá grannalondum okkara. Lýstu møguleikarnir til eina heildarætlan eru tískil úrslit av greiningum og samrøðum, gjørdar bæði við umheimin og heima hjá okkum her, og metir arbeiðsbólkurin, at hesi átøk eru besti hátturin at seta ferð á føroyska nýtslu av vitlíki.

Í víðari arbeiðinum, so er tað tørvur á at styrkja tey samstørv, sum tryggja, at vit koma best í gongd við hesa tilgongd. At greiða átøk til verksetan krevur eisini samskifti við áhugapartar, sum vit eiga at fara undir beinanvegin.

Ferðin, sum vitlíki mennist við, er tó so skjót, at tað eisini gerst avgerðandi, at fylgt verður við nýggjastu altjóða rákunum, so Føroyar kunnu vera millum fremstu lond í heiminum, eisini tá ið talan er um vitlíki.

Samanumtikið eiga vit skjótast gjørligt at fara víðari við tey trý avgerðandi stigini, ið tryggja eina felags kós: at fáa heildarætlanina lidna, at stovna eina miðsavnandi vitlíkiseind, og at seta gongd á ítøkiligar royndarverkætlanir. Við hesum kunnu vit vinna á avbjóðingum og óvissum, troyta møguleikarnar á bestan hátt, og samstundis styrkja føroyskt mál og mentan, føroyska samfelagnum til frama.

# 8. Forkanningin í frásjón

Henda forkanning hevur givið okkum eitt týðiligt innlit í, hvar Føroyar standa í mun til vitlíki í dag. Tá ið vit hyggja aftur á tilgongdina og fram ímóti tí komandi arbeiðinum, eru nakrar eygleiðingar, ið vit vilja draga fram.

## Breidd fram um dýpd

Forkanningin varð tilvitað skipað við einum breiðum leisti, har vit høvdu seks evnisbundnar verkstovur tvørtur um almenna geiran, vinnu, mál, etikk, førleikar og tøkniligt undirstøðukervi. Hendan breiddin hevur verið virðismikil: hon hevur givið okkum eina breiða mynd av støðuni í Føroyum og víst eina samanhangandi mynd tvørtur um sera ymisk øki.

Men breidd hevur sín prís. Tað eru øki, har vit ikki fingu farið í dýpdina – har kjakini lótu dyr upp, sum tíðin ikki loyvdi okkum at fara inn í. Verkstovurnar góvu góðar eygleiðingar, og luttakararnir sýndu veruligan áhuga og stórt innlit. Tað hevði havt stórt virði at havt uppfylgjandi fundir við fleiri teirra, fyri at royna tær niðurstøður, ið stungu seg upp, at kava niður í ítøkiligar avbjóðingar og at samskapa fyrstu loysnirnar. Hetta er nakað, sum arbeiðið við sjálvari heildarætlanini, ella einari komandi landsfevnandi vitlíkiseind, eigur at taka upp sum eina av sínum fyrstu raðfestingum.

Sama er galdandi fyri altjóða samstarv. Tá ið vit hava tosað við fólk úr øðrum londum – granskarar, fakfólk og avgerðartakarar – hevur afturvendandi royndin verið, at tey eru opin fyri samstarvi. Tað er ein veruligur vilji har úti at samstarva við Føroyar. Tað, sum vantar í løtuni, er onkur, ið tekur stig til og gongur á odda fyri at byggja hesi sambond. Ein landsfevnandi vitlíkiseind hevði verið væl egnað til at taka henda leiklut á seg, so Føroyar gerast ein virkin partur av norðurlendska og altjóða vitlíkisumhvørvinum, heldur enn ein passivur áskoðari.

## Vitlíki sum ein umbroytingarmegi

Vitlíki er ikki bert eitt nýtt amboð til verandi arbeiðsgongdir, men ein verulig umbroytingartøkni. Tøknin fer at kollvelta, hvussu vit arbeiða, veita tænastur, taka avgerðir og skapa vitan. Ferðin og vavið á hesi broyting er so stór, at vit sjáldan hava sæð tess líka. Tí er hetta ikki bert ein spurningur um KT, men ein samfelagslig avbjóðing, sum fer at krevja politiskar avgerðir tey komandi árini.

Hetta eigur ikki at elva til ótta, men til handling. Samfeløg, ið taka virknan lut og tillaga tøknina eftir egnum tørvi, standa munandi betur enn tey, ið bert taka ímóti. Fyri eitt lítið land sum Føroyar er nógv upp á spæl. Tær skipanir, sum verða mentar úti í heimi, eru ikki gjørdar við okkum í huga. Um vit ikki sjálvi seta kósina, verða tað onnur, ið seta treytirnar.

## Heildarætlan má ikki gerast koddi

Tað er umráðandi, at arbeiðið og úrslitið av eini heildarætlan um vitlíki ikki ger, at annað arbeiði steðgar hesum viðvíkjandi. Frá verkstovum og samrøðum, sum hava verið í hesi verkætlanini, er greitt, at tað eru øki í almenna geiranum, sum arbeiða virkin við vitlíki, bæði at leggja ætlanir fyri økini og at taka tað í brúk. Verkætlanin hevur lagt seg eftir ikki at taka ræðið á slíkum átøkum, men

at kortleggja átøkini, sum eru. Hugsanin hevur verið, at tá ið ein heildarætlan verður gjørd, kann hon í størri mun vísa á átøk, sum eru í almenna geiranum. Heildarætlanin kann tryggja raðfesting og at átøkini spæla væl saman í stóru heildini.

## Tørvur á neyvari váðameting

Arbeiðið við forkanningini hevur avdúkað, at umframt stórar møguleikar, ber vitlíki eisini váðar við sær. Ein greið niðurstøða er tí, at ein komandi heildarætlan eigur at gera eina neyva og djúpa váðameting.

Vitlíki breiðir seg í løtuni við stórari ferð tvørtur um landamørk og geirar. Til dømis vísa tøl frá OECD, at nýtslan av vitlíki í fyritøkum er tvífaldað upp á bert tvey ár. Henda altjóða gongdin ávirkar eisini Føroyar, og tí er tað í sjálvum sær ein váði at lata standa til. Tøknin verður longu tikin í nýtslu í føroyska samfelagnum og í almennu fyrisitingini, men ofta uttan tær neyðugu karmarnar til at tryggja rættindi, mál og trygd.

Ein neyv váðameting krevur tí, at heildarætlanin tekur ítøkiliga støðu til eina røð av avgerandi spurningum. Hetta fevnir millum annað um dátuvernd, teldutrygd, etisk sjónarmið, skuggavitlíki og verjuna av føroyska málinum. Hesi øki eru tó bert partur av einari størri mynd, og heildarætlanin má tí tryggja ein karm, ið megnar at lofta bæði kendum og nýggjum váðum, so hvørt sum tøknin og nýtslan mennast.

## Nýggjasta vitlíkistøknin hevur fingið mestu viðgerðina

Í forkanningini hevur tyngdin í viðgerðini í stóran mun verið løgd á nýggjastu málmyndlarnar. Orsøkin er tann kollveltandi broytingin, sum henda tøknin hevur við sær. Tøknin ger, at teldur í nógv størri mun kunnu brúkast til uppgávur, sum hava við mál at gera.

At henda tøknin fyllir so nógv á verkstovunum og í frágreiðingini, er av teirri einføldu orsøk, at meginparturin av kjarnuarbeiðnum í okkara modernaða samfelag er tengdur at máli. Nærum alt, vit gera, byggir á mál:

- Sjúkrarøktarfrøðingurin skrivar journal, tá ið viðkomandi hevur tosað við ein sjúkling umvegis mál á einari teldu.
- Málsviðgerin lesur umsóknir, lógir og skrivar avgerðir við máli á einari teldu.
- Lærarin fyrireikar undirvísingartilfar við máli á einari teldu.
- Politikarin og embætisfólkið skriva lógir, reglugerðir, teldupostar og vegleiðingar við máli.

Kjak, tíðindaflutningur, avgerðir um siðareglur og samstarv fer alt fram gjøgnum málið, oftast á teldum. Áður var teldan bert eitt amboð til at skriva og goyma hetta málið, uttan at skilja innihaldið. Nú kunnu vitlíkisskipanir luttaka aktivt, har vit brúka mál sum eitt amboð, og tað gera vit allastaðni.

Tískil hevur forkanningin ikki fevnt líka breitt um allar eldri, siðbundnar greinar innan vitlíki (sum t.d. maskinlæring). Vit hava í staðin hugsavnað okkum um nýggjastu mál- og teksttøknina, tí tað er júst her, at tøknin nú trínur inn í kjarnuna av tí menniskjaliga arbeiðinum. Hetta elvir til tær stóru óvissurnar, sum luttakararnir á verkstovunum vístu á, men tað er eisini her, at teir størstu møguleikarnir fyri at fremja munadyggar broytingar í føroyska samfelagnum liggja.

# Fylgiskjøl



# Fylgiskjal 1. Samanumtøkur frá verkstovum

Í hesum fylgiskjali eru samanumtøkur frá hvørjari verkstovu, sum vit hildu.

Verkstovurnar vóru:

1. Kappingarfør vinna
2. Føroyskt fyrst og fremst
3. Etikkur og ábyrgd
4. Fatan og førleikar
5. Munadyggur almennur geiri
6. Tøkniligt undirstøðukervi

Í hesum fylgiskjali eru samandráttir frá hesum verkstovunum.

## 1. Kappingarfør vinna

Í vinnuni eru føroyskar fyritøkur farnar undir at royna vitlíki í gerandisvirkseminum, men støðan er merkt av stórum muni millum fyritøkurnar. Flestu hava lítið annað enn spjaddar royndir ella eru ikki farnar í gongd enn, meðan bert einstakar fyritøkur eru komnar nakað víðari við at seta skipaðar innanhýsis leiðreglur ella hava roynt at knýta vitlíki tættari at kjarnuvirkseminum.

Sjálvt hjá fremstu fyritøkunum er nýtslan enn avmarkað, tá hugsað verður um, hvat sæst er møguligt úti í heimi. Á verkstovuni vístu luttakararnir á greiðar forðingar, ið halda aftur einari breiðari og meira gagnligari nýtslu:

- Óvissa um reglur og ábyrgd.
- Tørvur á einum felags staði at fáa ráðgeving.
- Trupulleikar við atgongd til almennar dátur - lýst púra greitt sum at Føroyar kennast "læstar".
- At vitlíkisamboðini ikki rigga nóg væl á føroyskum.

Hesar bygnaðarligu forðingar fáa fyritøkurnar ikki loyst hvør sær, og skal bilbugt fáast við tær, krevst felags regluverk og miðvís átøk til at betra um vitlíki á føroyskum og ein almenn ráðgevandi tænasta.

## 2. Føroyskt fyrst og fremst

Samlaðu niðurstøðurnar frá hesi verkstovuni vóru at:

- Samanhangurin í føroyska málinum viknar. Málið er undir stórum trýsti í vitlíkisøldini, og gloppið millum talað og skrivað mál gerst alsamt størri.
- Um vit ikki sjálvi tryggja føroyskt í vitlíki, taka útlendskir tøknirisar ræði á, hvussu málið skal virka talgilt.
- Føroyskt má vera tøkt í vitlíki, so tað framvegis kann vera høvuðsmálið í arbeiðslívinum.
- Fyri at málmyndlar skulu rigga væl á føroyskum, so er tørvur á nógv fleiri góðum føroyskum dátum. Neyðugt er at gera avtalur um rímiligt gjald til teirra, ið hava skapt tilfarið.

- Vitlíki kann gagnnýtast at styrkja málið á ymsum økjum, um rætt verður borið at.
- Lyklaáhugapartar mugu draga eina línu.
- Fígging er ein høvuðsfortreyt fyri at tryggja føroyska málið í vitlíkisøldini.

*"Vit síggja, at samanhangurin í føroyska málinum er við at fara"*

Soleiðis segði ein luttakari á hesi verkstovuni. Útsøgnin lýsir kjarnuna í teirri stúran, sum flestu luttakararnir kendu seg aftur í. Avbjóðingin snýr seg ikki bert um at varðveita málið, men um eina ítøkiliga svinnan av málsligum bygnaði og mentan, sum luttakararnir merkja í gerandisdegnum, serliga millum tey ungu.

Verkstovan savnaði lyklaleikarar innan mál, mentan, undirvísing og tøkni, fyri at skilja hvørjar felags avbjóðingar og møguleikar, tey síggja við vitlíki fyri føroyska málið. Tað var breið semja um, at føroyskt mál er undir stórum trýsti í vitlíkisøldini. Hóast nógv skapandi arbeiði fer fram á føroyskum, varð víst á, at ung hava alsamt truplari við at orða seg á móðurmálinum, og at gloppið millum talað og skrivað føroyskt gerst størri.

Ein afturvendandi avbjóðing, sum hongur saman við útsøgnini omanfyri, er óvissan um, hvønn leiklut føroyskt fer at spæla í talgildu framtíðini. Ein luttakari orðaði tað soleiðis:

*"Um vit ikki gera nakað við føroyskt í vitlíki, so gera tey tað í Silicon Valley."*

Henda óvissan vísir á, at avbjóðingin við vitlíki ikki bert er tøknilig, men at tað í eins stóran mun er ein spurningur um sjálvræði og mentanarliga sjálvsavgerð. Uttan strategisk átøk fara útlendskir tøknirisar at avgera, hvat føroyskt skal vera, og hvussu tað skal virka í talgildum skipanum.

At hetta eisini er ein spurningur um demokratisk rættindi og ræði, gjørdist týðiligt, tá tosað varð um møguleikar. Ein útsøgn, tá tosað var um ítøkiligar møguleikar, var:

*"Fólk hava rætt til sítt mál, har sum tey eru í talgilda heiminum."*

Hetta vísir, at fyri at skilja hvat vitlíki er í dag, og hvørjar uppgávur, tað er væl egnað til, krevst ikki bara tøknilig vitan, men eisini tilvitan um grundleggjandi rættindi og virði. Hetta er tískil nakað, vit mugu hugsa um framyvir: hvussu vit lyfta vitanarstøðið, so vit fáa gagnnýtt vitlíki á bestan hátt við virðing fyri málinum.

Víst varð tó á, at tað á nøkrum økjum í talgilding, so er støðan hjá føroyska málinum í lagi. Eitt dømi um hetta er teldutala. Greitt er tó, at tá ið tað kemur til málmyndlar, so er tað ikki bert ein spurningur um nakað, sum vit ikki hava ræðið á, men eisini nakað sum ikki riggar nóg væl á føroyskum enn.

Ein týðandi partur av kjakinum snúði seg eisini um rættindi og dátur. Víst var á, at um føroyskt skal rigga væl í málmyndlum, so er tørvur á nógv fleiri góðum føroyskum dátum. Fleiri eru, sum halda at verandi lóggáva er ein forðing her vegna rættindi. Víst var á, at avbjóðingin heldur er vantandi kunnleiki til lógina. Loysnin liggur í at gera avtalur millum partarnar um nýtslu og rímiligt gjald. Tí er neyðugt, at tá játtan verður givin til talgilding og menning, skal peningur eisini setast av til at samsýna tey, ið hava skapt tilfarið, sum tøknin byggir á.

Tosað varð um møguligar vitlíkisverkætlanir á verkstovuni, og fleiri góð og ítøkilig boð komu upp á, hvussu vitlíki kann styrkja føroyskt mál og mentan. Nøkur ítøkilig dømi, ið vórðu nevnd, eru undirvísingarstuðul til næmingar og lærarar, týðing og teksting fyri at gera føroyskt tilfar atkomuligt fyri umheimin og hjálpartól til t.d. fólk við breki og tilflytarar.

Staðfest varð, at vitlíki er við at broyta arbeiðsgongdirnar í Føroyum grundleggjandi, og her er føroyska málið undir trýsti. Um okkara talgildu hjálparar ikki duga nóg væl føroyskt, so kann føroyskt koma undir trýst sum okkara arbeiðsmál.

Hetta er ein strategiskur váði. Vandi er fyri, at føroyskt missir sítt virði sum fakmál og endar sum eitt heimamál. At gera føroyskt tøkt í vitlíkisamboðum er altavgerandi, um vit vilja tryggja, at føroyskt framhaldandi er høvuðsmálið í tí føroyska arbeiðslívinum. Føroyingar eiga at kunna brúka sítt móðurmál í sínum starvi.

Hóast hetta var eisini víst á, at tað eru gjørd fleiri góð talgild átøk málinum at frama, sum eru gott grundarlag fyri at føroyska vitlíki. Fyrst og fremst arbeiðið hjá Máltøknideplinum, men eisini verkætlanir so sum Ravnur.

Tað eru nógvir áhugapartar, bæði almennir og vinnuligir, sum mugu arbeiða saman, um hetta skal eydnast. Staðfest varð, at tað er sera umráðandi, at hesir áhugapartar draga eina línu. Afturat hesum, so varð munagóð fígging nevnd, sum ein av størstu fyritreytunum fyri at tryggja føroyska málið í vitlíkisøldini.

# 3. Etikkur og ábyrgd

Álit frá borgarum er avgerandi, um vit skulu brúka vitlíki í almennum tænastum. Á verkstovuni “Etikkur og ábyrgd” kom týðiliga fram, at luttakararnir vænta, at vitlíki fer at hava stóra ávirkan tey næstu fimm árini. Tey sóu ikki bara møguleikar fyri at lætta um umsiting, men eisini stóran fyrimun í at styrkja borgarar í at loysa ymiskar avbjóðingar. Við vitlíki kunnu hesi gerast meira sjálvbjargin og loysa uppgávur, tey annars hava tørvað hjálp til, og soleiðis kann tøknin verða við til at lyfta lívsgóðskuna munandi.

Tó løgdu tey dent á tvær avgerandi fortreytir fyri almennum áliti, serliga innan heilsu- og almannaøkið: Greiðar reglur skulu tryggja, at vitlíki ongantíð kemur í staðin fyri neyðuga menniskjaliga samveru, og fullkomið gjøgnumskygni skal tryggja, at borgarar vita, nær tey samskifta við eina maskinu.

Í dag eru hesar fortreytir ikki til staðar, tí greiðar leiðreglur og ábyrgdarkarmar mangla, og hetta skapar ítøkiligar forðingar fyri ábyrgdarfullari nýtslu.

Harumframt kom fram, at verandi ráð og nevndir - eitt nú Etiska ráðið og Dátueftirlitið - í løtuni ikki eru nóg væl ílatin fakliga til at viðgera tær serskildu etisku og tøkniligu avbjóðingar, sum vitlíki hevur

við sær. Tí varð mælt til at umhugsa, um verandi stovnar skulu styrkjast, ella um tørvur er á heilt nýggjum skipanum.

# 4. Fatan og førleikar

Samanumtikið, so vóru niðurstøðurnar frá verkstovuni um fatan og førleikar í vitlíki at:

- Tað gerst umráðandi at læra um vitlíki longu í fólkaskúlanum.
- Tað verður umráðandi, at Føroyar kunnu útbúgva vitlíkisserfrøðingar.
- Tey, sum ikki ganga í skúla, hava møguleika fyri eftirútbúgving og harvið fáa eitt lyft.
- Tað er tørvur á eini felags kós og raðfesting.
- Tað er tørvur á einum depli, sum hevur vitlíki sum serfrøði og kann veita ráðgeving og hjálp.

Til spurningin “Hvussu átrokandi metir tú tørvin vera á fatan og førleikum um vitlíki í Føroyum?” sum skuldi metast frá 1 (als ikki) til 5 (sera nógv), so mettu øll, at støðan er á einum 4 ella 5 tali.

> *“Fatanarparturin er tað umráðandi, so koma førleikarnir aftaná.”*

Tað var týðiligt, at luttakararnir meta, at vit eiga at leggja eins stóran dent á at fáa eina breiða fatan av vitlíki í samfelagnum, eins og djúpar tøkniligar førleikar um vitlíki.

Fyri borgaran er tað greitt, at fólk ikki skilja, hvussu tey sjálvi fáa sum mest burturúr tøknini, og hvussu tey sjálvi verja seg sum frægast fyri váðunum.

Við hesum í huga, so vórðu spurningar vendir sum - eru vitlíkis- og talgildisbúgving grundførleikar at samanbera við at lesa og rokna? Í rúminum var metingin, at vitlíki hoyrir til talgildisbúgving, og at talgildisbúgving er á sama stigi sum lesing og rokning. Undirvísingarverkið arbeiðir við hesum, men tað kann gerast neyðugt at hugsa breiðari, so onnur enn skúlanæmingar eisini fáa eitt lyft.

Lærarastøðan fylti nógv, og av góðari grund. Lærarin er í andgletti, tí læring og undirvísing er eitt øki, sum er sera avbjóðað av nýggju tøknini. Nýtsla av vitlíki verður ofta sædd sum snýt heldur enn dugnaskapur. Tað er umráðandi, at undirvísingarverkið fær lýst væl, hvussu vitlíki á rættan hátt kann verða brúkt í undirvísing.

Tað er tó púra greitt, at í mun til vitlíki, er tørvurin ikki bert at innføra læring í skúlunum, men tað eru eisini sera nógv onnur, sum mugu læra at brúka vitlíki. Eitt hugtak sum "lívlong læring" varð vent, og passar tað væl við rákið, sum vit síggja við vitlíki í dag, har nógv nýtt hendir alla tíðina. Tað gerst neyðugt, at fólk kunnu halda seg dagførd um hesa nýggju tøknina á ymsum økjum. Fyri at møta hesum tørvi, so vil tað krevja ávís átøk og tað var breið semja um, at landið, vinnan og fakfeløgini øll hava eina ábyrgd her - bæði fíggjarliga og fyriskipanarliga.

Nakað sum í viðgerðini av økinum gjørdist púra greitt, var, at vit vita ikki, hvar vit skulu fara í løtuni. Strategisk kós og politisk raðfesting vantar. Fólk og stovnar royna seg fram við smærri átøkum, men tað manglar ein yvirskipaður karmur og felags málsetningur. Uttan hesa kósina, endar vitlíki sum ósamanhangandi royndir, og tað økir bæði um vandan fyri skeivari nýtslu og um váðan fyri, at vit ikki fáa veruligt gagn burturúr tøknini.

Í endamálinum við heildarætlanini verður sagt, at vit skulu leggja eina heildarætlan fyri vitlíki, sum vísir bæði, hvussu samfelagið fær sum mest burturúr tøknini, og hvussu vit verja okkum sum frægast fyri váðunum. Í roynd og veru byrjar tann verjan við fatan og førleikum: at fólk skilja, hvat vitlíki er (og hvat tað ikki er), duga at brúka tað skynsamt, og kunnu meta um dátu-, trygdar- og dygdarváðar í gerandisdegnum. Sama fatan er eisini fortreytin fyri, at einstaka starvsfólkið kann finna røttu nýtsludømini í sínum starvi og skapa ítøkiligar léttar í arbeiðinum.

Tá vit tosa um fatan og førleikar í vitlíki, so skulu vit ikki síggja tað einans sum tøkniligar førleikar, men sum ein samfelagsligan grundførleika, ið bæði gevur gagn og minkar um váðar.

# 5. Munadyggur almennur geiri

Samanumtikið frá verkstovuni, kann sigast at:

- óvissa og ótti valda í mun til persónsviðkvæmar dátur, og hvat tað er loyvt at brúka vitlíki til í dag. Hetta er ein sera stór forðing fyri at fremja átøk. Tí er tørvur á standardiseraðum politikkum. Heldur enn at hvør stovnur skal tulka lógina av nýggjum, skulu vit menna góðkend mynstur, soleiðis at stovnar kunnu fara í gongd uttan ótta fyri at gera mistøk.
- tað eru nógvir møguleikar at síggja, har vitlíki kann vera við at betra um almennu tænasturnar. Her er tørvur á at greina møguleikarnar nærri og avgera, hvar tað er best at hjálpa.

Verkstovan savnaði lyklaleikarar í almenna geiranum fyri at skilja, hvørjar felags avbjóðingar og møguleikar, tey síggja við vitlíki. Tað var breið semja um, at Føroyar halta aftaná at taka vitlíki í nýtslu. Tað var tó samstundis eisini breið semja um, at tey síggja sera stórar møguleikar við at brúka vitlíki á ymsum økjum. Onkur átøk eru longu sett í gongd, men fleiri av teimum eru enn á byrjanarstøði. Nevnast kunnu dømi sum kjattbottar og nýtsla av ChatGPT og líknandi tænastum. Vitlíki verður eisini í samstarvi við stovnar í Danmark brúkt á summum økjum í heilsuverkinum til at betra um tænastuna til borgaran. Ein afturvendandi avbjóðing er óvissa um, hvat er loyvt at gera og hvat ikki er loyvt, og ein ótti um at brúka persónsdátur skeivt. Henda óvissan og hesin óttin geva eina ábending um, at avbjóðingin við vitlíki ikki bert er ein tøknilig avbjóðing, men at tað eins nógv er ein spurningur um løgfrøði og fatan. At hetta er ein spurningur um fatan, sást eisini aftur, tá ið tosað varð um ítøkiligar møguleikar. Ein útsøgn hesum viðvíkjandi var: "Tað er torført at síggja mun á vitlíkisuppgávum og øðrum tøkniligum uppgávum"

Hetta gevur eina ábending um, at tað er avmarkað við fatan av, hvat vitlíki er, og hvørjar uppgávur tað er væl egnað at loysa. Hetta er tískil nakað, sum vit mugu hugsa um framyvir, um hvussu vit lyfta vitanarstøðið hjá serfrøðingum, avgerðartakarum og øðrum, sum skulu arbeiða við vitlíki, so vit fáa gagnnýtt vitlíki á bestan hátt.

Tosað varð um ítøkiligar vitlíkisverkætlanir á verkstovuni, og tað komu fleiri góð og ítøkilig boð upp á, hvussu vitlíki kann vera við at lyfta tænastustøðið hjá almenna geiranum á ymsum økjum. Nøkur ítøkilig dømi, ið vórðu nevnd, eru viðgerð av byggisamtyktum, sjálvvirkandi skjalfesting og journalisering, umframt fleiri onnur. Verkstovuluttakararnir vístu eisini á nakrar meira yvirskipaðar tørvir. Her kunnu nevnast tørvir á:

- Eini vitlíkiseind, sum eisini umfatar eitt úrvalslið.
- Felags politikkum og vegleiðingum til stovnar.
- Undirstøðukervi, sum tænasturnar trygt kunnu hýsast á.

# 6. Tøkniligt undirstøðukervi

Samanumtikið kann sigast:

- At tað er ein kritiskur mangul á lokalum vitlíkisundirstøðukervi í dag, tí marknaðurin er lamin av aftran. Veitarar bíða eftir einum greiðum tekni, áðrenn stórar íløgur verða gjørdar, og hetta økir vandan fyri, at Føroyar gerast bundnar at útlendskum veitarum viðvíkjandi samfelagskritiskum skipanum.
- At vit mugu halda fast í strategiini um talgilt sjálvræði við at tryggja, at vit hava staðbundna rokniorku til at reka kritiskar vitlíkistænastur, so vit eru vard móti avbyrging, um sambandið við umheimin verður kvett.
- At málið er 'strategisk trygd', ikki fullkomið sjálvbjargni. Vit skulu framhaldandi brúka loysnir í skýnum, har tær geva meining, men vit mugu byggja staðbundna rokniorku, sum megnar at hýsa teimum mest neyðugu tænastunum.

*“Vitlíki kann gerast samfelagskritiskt.”*

Henda útsøgn frá verkstovuni um tøkniligt undirstøðukervi varpar ljós á eitt grundleggjandi skifti í okkara talgildu tilbúgving. Søguliga, hevur føroyska strategiin verið, at samfelagskritiskar skipanir skulu hýsast í Føroyum. Higartil hevur hetta verið gjørligt við siðbundnum KT-undirstøðukervi. Men við vitlíki stinga nýggjar avbjóðingar seg upp við vantandi rokniorku (GPU), sum er neyðug fyri at reka hesar nýggju skipanir.

Verkstovan avdúkaði eina “bíða-og-síggja” støðu, sum hevur við sær, at Føroyar í dag hava nærum onga alment atkomuliga vitlíkisrokniorku. Veitarar aftra seg við at gera tær stóru íløgurnar í dýra útgerð uttan ein greiðan marknað. Í einum umhvørvi, har tann tøkniliga menningin gongur við rúkandi ferð, er tað ein fíggjarligur váði at gera íløgur í tunga rokniorku uttan at hava ein tryggan kunda.

Verkstovan vísti, at lítla rokniorkan sum er tøk, er avmarkað til granskingarendamál á Fróðskaparsetrinum, og bæði vinnulív og almenna fyrisitingin mangla undirstøðukervi til at hýsa og reka virknar vitlíkistænastur innanlands. Av tí at tað almenna enn ikki hevur boðað frá greiðum eftirspurningi ella lýst sín tørv, so stendur marknaðurin í stað. Tað er nógv sum bendir á, at tað er umráðandi, at tað almenna ger sær hetta greitt. Veitarar vístu á, at vinnan kann ikki bera váðan av hesum íløgum einsamøll, og greiða um, hvør tørvurin hjá tí almenna verður, hevði minkað um váðan. Her gerst tað tørvur á, at tað almenna og vinnan samstarva um, hvørjir tørvir mugu lýsast.

Mangulin í dag rakar okkara dátusjálvræði og tjóðskaparliga mótstøðuføri hart. Sum oyggjasamfelag eru vit serliga útsett; at vera fult og heilt bundin at útlendskum sambondum ger okkum viðbrekin. Um sjókaðlar slitna, ella sambandið við umheimin verður kvett, er okkara førleiki at reka kritiskar tænastur í vanda, um vit ikki hava staðbundnan kapasitet til at viðgera dátur sjálv.

Og hóast vit í dag kunnu leiga rokniorku uttanlands, er hetta ein svikalig trygd. Alt bendir á, at rokniorka fer at gerast eitt knapt tilfeingi í framtíðini. Tá eftirspurningurin er størri enn útboðið, raðfesta stóru veitararnir sínar strategisku kundar og egnu tjóðir. Vandi er fyri, at Føroyar enda aftast í bíðirøðini ella missa atgongdina heilt. Uttan staðbundna orku eru vit púra bundin at einum marknaði, sum vit onga ávirkan hava á.

Hóast hesar avbjóðingar, er loysnin ikki neyðturviliga at byggja risastórar superteldur fyri at kappast við altjóða tøknirisar. Sum ein veitari orðaði sín hugburð um, hvussu hann hugsaði at fáa byrjan á:

*“Byrja lítið, men hugsa stórt.”*

Semja var um, at vit ikki skulu miða eftir at byggja tað stóra undirstøðukervið, sum krevst fyri at venja nýggjar grundleggjandi málmyndlar frá grundini - tað er ein uppgáva fyri altjóða samstarv og felags norðurlendskar hentleikar. Heldur eigur okkara strategiska fokus at vera á rakstrartrygd. Vit mugu eiga nóg mikið av undirstøðukervi í Føroyum fyri at tryggja, at samfelagskritiskar tænastur eru tøkar alla tíðina, sjálvt um sambandið uttanlands verður avbrotið, ella altjóða marknaðurin letur aftur fyri okkum. Samstundis skulu vit gagnnýta altjóða loysnir í skýnum, har tað gevur meining, til dømis til venjing av myndlum ella minni týdningarmikið arbeiði.

Boðini til politisku skipanina eru greið: Vinnan bíðar eftir leiðslu. Uttan almenna luttøku - gjøgnum fígging, strategi og við at vera ein “akkerskundi” - kunnu veitarar ikki gera neyðugu íløgurnar. Hvør dagur uttan átøk økir um vandan fyri at vit gerast ov bundin at útlendskum veitarum og um vandan fyri, at Føroyar enda sum ein passivur brúkari av vitlíki heldur enn ein aktivur leikari við talgildum sjálvræði.

# Fylgiskjal 2. Altjóða samanbering

Eins og lýst í frágreiðingini, so verða nøkur evni lýst her. Heldur enn heildarætlanir eru tað her meira altjóða rák, sum verða lýst í hesum fylgiskjali.

## Føroyska málið: Íslendskar royndir og gransking

Tá hugt verður eftir, hvussu onnur smámálasamfeløg hava megnað at tryggja sær eitt pláss í talgilda heiminum, skarar Ísland framúr. Ísland hevur somu stóru avbjóðingar sum Føroyar, men hevur hóast hetta megnað at gera íslendskt til ein virkandi part av nútíðar vitlíkisskipanum.

Í beinleiðis samrøðum við forfólkini í íslendsku verkætlanini Almannarómur, kunnu vit staðfesta, at tað krevur eina tilvitaða politiska raðfesting, sum røkkur langt fram í tíð. Íslendskir myndugleikar tóku eina greiða avgerð um at gera stórar íløgur og stovnaðu Almannaróm til at samskipa arbeiðið millum stjórnarvald, gransking og vinnu. Tey settu ferð á dátusavning, og hetta miðvísa arbeiðið gjørdi Ísland til ein áhugaverdan samstarvsfelaga hjá vitlíkisrisanum OpenAI, sum valdi at brúka íslendskt sum royndarverkætlan. Úrslitið var, at íslendskt tíðliga varð innlimað í eitt av heimsins mest nýttu vitlíkisamboðum - tí Ísland hevði gjørt fyrireikingararbeiðið.

Fyri Føroyar er lærdómurin greiður: Vit kunnu ikki bíða eftir, at stóru tøknirisarnir “finna” okkum. Vit mugu sjálvi taka stig til eina skipaða tilgongd at savna dátur og mugu gera okkum til ein áhugaverdan samstarvsfelaga.

Ætlanir um at savna inn dátur eru lagdar. Í hesum sambandi var serliga hugt til Noregs og teirra arbeiði at savna dátur. Hátturin, sum tey hava brúkt har, passar væl til, hvussu føroyska samfelagið er skipað. Har er tað norska tjóðbókasavnið, sum stendur fyri dátusavninum. Aðrir stovnar og fyritøkur veita reinsaðar dátur, sum so verða goymdar í savninum. Hesar dátur kunnu síðan deilast og verða brúktar til at menna amboð innan t.d. vitlíki. Sum lýst omanfyri, so er tað avgerandi fyri Føroyar, at gongd kemur á hetta arbeiðið.

Frá granskingarumhvørvinum fáa vit eitt annað tøkniligt sjónarhorn. Granskingin vísir, at loysnin fyri smámál ikki nýtist at vera at byggja alt frá botni. Heldur er strategiin at byggja omaná tað, sum longu finst. Vit kunnu brúka verandi norðurlendskar málmyndlar sum grundarlag og síðan fínstilla við tí, sum er serskilt og upprunaliga føroyskt. Men granskingin staðfestir eisini greitt, at mongd og góðska av dátum er sjálvt grundarlagið - og at gloppið millum tað vit hava í dag, og tað sum krevst, er stórt. Hetta er ein staðfesting av, at vit mugu taka hesa uppgávuna í álvara.

Samanumtikið vísa bæði dømini, at dyrnar til altjóða samstarv standa opnar, men at vit sjálvi mugu taka stigið at fara um gáttina. Stórir aktørar og granskingarstovnar í Norðurlondum vilja fegin samstarva, men treytin er, at vit í Føroyum hava grundleggjandi karmarnar í rættlag. Tað krevur, at vit hava ein bygnað ella eind, sum kann lyfta uppgávuna (eins og Almannarómur), at vit hava dátur av rættari góðsku, og at vit hava fíggingina upp á pláss. Um vit fáa hetta grundarlagið til vega, so eru ríkir møguleikar fyri at lyfta føroyskt inn í talgildu framtíðina saman við øðrum.

# Verksetan: Royndir úr Estlandi og Danmark

Tá ið upprunaliga varð farið undir Talgildu Føroyar, so var Estland ein týðandi kelda til íblástur. Tí var tað náttúrligt, at vit í hesi verkætlanini aftur hugdu til Estlands. Hóast Estland hevur fleiri íbúgvar enn Føroyar, er tað í altjóða høpi eitt lítið land.

Kortini hevur tað megnað at gerast eitt av heimsins fremstu talgildu samfeløgum, og seinastu árini eisini eitt av teimum mest framsøknu, tá tað kemur til skipaða nýtslu av vitlíki í almenna geiranum.

Á fundum við tey, ið hava staðið á odda fyri estlendska arbeiðinum við dátum og vitlíki síðan 2018, hava vit fingið eina greiða mynd av, hvussu hetta varð gjørt. Tilgongdin var ikki bygd á stórar langtíðarætlanir ella veldugar íløgur frá byrjan. Heldur byrjaðu tey smátt og miðvíst: Tey byrjaðu við at byggja grundleggjandi førleikar, stovnaðu viðkomandi útbúgvingar og settu í verk eina røð av smærri royndarverkætlanum við avmarkaðum fíggjarkørmum.

Summar av hesum verkætlanum eydnaðust, aðrar eydnaðust ikki eins væl, men bæði tað, sum eydnaðist, og tað, sum miseydnaðist, varð góðtikið sum lærdómur. Tað týdningarmesta var, at stovnarnir lærdu, búnaðust og fingu eina fatan av, hvat vitlíki kann og ikki kann loysa. Ein avgerandi faktorur var, at Estland legði dent á at máta og vísa á úrslit skjótt fyri at varðveita politiska undirtøku tvørtur um 14 ymiskar ráðharrar upp á sjey ár.

Lærdómurin fyri Føroyar er at hyggja at hugburðinum: Byrja við royndarverkætlanum, góðtak at feilir eru partur av læringini, eyðmerk trupulleikan áðrenn tøknina, og tryggja, at fatan og førleikar mennast hjá avgerðartakarum saman við tøkniligu førleikunum.

Estland hevur eisini í januar 2026 sett í verk eina nýggja ætlan, "Eesti.ai", við eini framasøknari visjón um at tvífalda virðið av arbeiðinum hjá estlendska fólkinum innan 2035. Málsetningurin er ítøkiligur: Ein vøkstur í bruttotjóðarúrtøkuni (BTÚ) upp á 25% innan fimm ár og 50% innan 2035. Ætlanin velur út verkætlanir við stórum ávirkanarmøguleikum innan øki sum útbúgving, heilsu og ídnað, og tær verða framdar í fokuseraðum 18-mánaða skeiðum. Hetta váttar, at sjálvt Estland, sum hevur áralangar royndir, heldur fast í at arbeiða í fokuseraðum, smábýttum ringrásum heldur enn at royna at gera alt í senn.

Ein partur av tí, sum hevur gjørt estiska arbeiðið smidligt, er, at tey longu hava ein felags og tryggan máta at lata skipanir samskifta: X-Road. Hon er lýst sum mergurin í e-Estonia og ger, at dátur kunnu flytast beinleiðis millum stovnar við greiðum loyvum og sporføri. Hetta er eisini ein fortreyt fyri, at vitlíki kann gerast veruliga nyttugt í verki, tí nógvir av teimum sterkastu nýtsluháttunum krevja, at rættar upplýsingar kunnu finnast og setast saman tvørtur um skipanir - uttan at hvør stovnur byggir sína egnu loysn.

Føroyar hava longu hetta undirstøðukervið. Vit hava tikið X-Road í nýtslu og givið pallinum navnið Heldin, og tað gevur okkum møguleika at “leypa um” eitt heilt stig í verksetanini. Í staðin fyri fyrst at brúka nógv ár upp á at byggja brúgvar millum skipanir, kunnu vit skjótari velja nakrar fáar royndarverkætlanir, har virðið er greitt, og har fleiri stovnar hava tørv á at deila dátur - og samstundis halda fast í trygd og greiðum reglum um, hvør sleppur at síggja hvat. Tí kann ferðin hjá Føroyum í stóran mun vera avgjørd av, hvussu skjótt vit fáa felags arbeiðshættir og einfaldar, greiðar avtalur um dátudeiling í rættlag, heldur enn av tøknini sjálvari.

Danmark bjóðar eitt annað sjónarhorn, sum er áhugavert, tí tey hava longu verið ígjøgnum eina royndarfasu. Í desember 2025 gjørdi danska stjórnin, kommunurnar og regiónirnar eina avtalu um at savna kreftirnar um tríggjar stórar vitlíkisverkætlanir heldur enn at spjaða orkuna. Við eini játtan upp á 266,7 mió. kr. hava tey valt út trý øki, har tøknin er búgvin, og virðið er prógvað:

1. **Sjálvvirkandi skjalfesting:** Nýtsla av talu-til-tekst fyri at minka um tíðina, sum heilsu- og umsorganarstarvsfólk brúka upp á journalisering, so meira tíð verður til borgaran.
2. **Talgildir hjálparar til borgarar og vinnu:** At fara frá statiskum sjálvgreiðslum til vitlíkisstýrdar hjálparar, sum kunnu veita betri og meira persónliga vegleiðing.
3. **Avgerðarstuðul til starvsfólk:** At geva málsviðgerum amboð, sum kunnu stuðla í torgreiddum avgerðum og gera málsviðgerðina skjótari og betri.

Hesar verkætlanir eru allar góð boð um nakað, sum eisini kundi gjørt mun á økjum, sum í dag eru undir trýsti. Legg til merkis, at tala-til-tekst verður brúkt. Eisini á hesum øki er tørvur á menning á føroyskum.

Í Danmark hava tey eisini sett á stovn eitt úrvalslið innan vitlíki. Hetta úrvalslið er sett til at seta ferð á verksetanina av vitlíki í danska almenna geiranum. Úrvalsliðið er ein avgerandi partur av fremjanini av verkætlanunum, sum eru nevndar omanfyri. Avgerandi fyri hetta úrvalslið er atgongd til ymsar førleikar. Í hesum føri er ikki talan um tøkniligar førleikar, men um meira víttfevnandi førleikar. Samansetingin av toyminum er eftir, hvørjir førleikar mangla og hvørjar førleikar til ber at heinta inn í nærumhvørvinum hjá toyminum. Toymið hevur nevniliga bæði fastar limir, og kann eisini fáa limir inn í avmarkað tíðarskeið frá øðrum stovnum eftir tørvi. Úrvalsliðið hevur sæð menningina, frá verksetan av royndarverkætlanum til meir miðsavnaðar verkætlanir, sum víst er á omanfyri. Spurd um royndarverkætlanirnar eru avgerandi fyri at menna førleikar og geva innlit í, hvar rætt er at brúka orku, var svarið, at vit í Føroyum kunnu læra av royndunum hjá teimum. Royndarverkætlanir kunnu verða virðismiklar fyri okkum, men tað er ikki tørvur á at gera eins nógvar, og vit kunnu læra av teimum, í mun til hvar tað gevur best meining at byrja.

Samanumtikið umboða Estland og Danmark tvær ymiskar strategiir. Estland vísir vegin við smærri, afturvendandi royndarverkætlanum, sum menna førleikar og minka um váðan. Danmark vísir hinvegin eina tilgongd, har kreftirnar verða savnaðar um stórar verkætlanir á fáum økjum, eftir at tøknin er prógvað. Fyri Føroyar kann sigast, at tað er rætt at byrja við royndarverkætlanum, har vit við vitan frá royndunum í t.d. Danmark kunnu leggja okkum á verkætlanir, har tað er sannlíkt, at verkætlanin eydnast væl. Tá ið vit hava uppbygt førleikar í verksetan av vitlíki, so kunnu vit meta um, hvør leistur hóskar best til okkara støðu - ella um vit skulu velja eina loysn, ið sameinir tað besta frá báðum.

## Tøkniligt undirstøðukervi: Altjóða samstarv er lykilin

Eitt tað mest týðiliga teknið frá okkara kanningararbeiði er, at smá lond byggja ikki sítt egna tøkniliga undirstøðukervi til vitlíki einsamøll. Tey fáa atgongd gjøgnum samstarv.

Á fundum við Almannaróm í Íslandi gjørdist tað greitt, at hóast Ísland hevur arbeitt við máltøkni í fleiri ár, reka tey ikki sína egnu rokniorku til tungar uppgávur. Til at venja stórar málmyndlar brúkar Ísland heldur LUMI - EuroHPC-supercomputaran í Finnlandi, sum er ein av teimum sterkastu í Evropa.

Sama mynstur sást í samrøðum við eina leiðandi máltøknifyritøku í baltalondum. Hóast fyritøkan hevur áratíggju av royndum og luttekur í stórum evropeiskum verkætlanum, er teirra høvuðs-undirstøðukervi til venjing eisini hýst hjá LUMI. Boðskapurin er greiður. Sjálvt væl etableraðir aktørar byggja ikki sínar egnu “superteldur”. Tey tryggja sær atgongd gjøgnum røttu samstarvsavtalurnar.

Hetta er ein avgerandi lærdómur fyri Føroyar. Spurningurin er ikki, um vit skulu byggja okkara egnu stórskala rokniorku, men heldur hvussu vit kunnu tryggja okkum atgongd til felags undirstøðukervi gjøgnum altjóða samstarv. Bæði Ísland og aktørar í baltalondum hava funnið sína loysn gjøgnum LUMI og EuroHPC karmar. Hesin vegur er eisini opin fyri okkum, um vit skapa tað rætta bygnaðarliga og politiska grundarlagið.

Niðurstøðan er tí, at vit eiga at raðfesta slíkt samstarv tíðliga í tilgongdini. Undirstøðukervið finst longu. Tað, sum krevst, er, at Føroyar staðseta seg sum ein virkin luttakari í tí norðurlendska og evropeiska umhvørvinum fyri vitlíki, heldur enn at standa uttanfyri.

# Rák tvørtur um lond

Hesin parturin fevnir um fleiri enn tey trý dømini omanfyri. Í hvørjum einstøkum føri spyrja vit: Hvat hevur hetta at siga fyri tað, vit skulu byggja í framtíðini?

## ES: Reglur og íverksetan

Evropa velur ikki ímillum reglugerð og nýtslu. Tey gera bæði. Lógin um vitlíki (AI Act) kom í gildi 1. august 2024. Tær flestu ásetingarnar galda frá 2. august 2026. Eitt longri skiftistíðarskeið til 2. august 2027 er galdandi fyri ávísar vitlíkisskipanir við høgum váða, serliga tær, sum eru partur av reguleraðum vørum. Summar skyldur galda fyrr, eitt nú forboð móti ávísari nýtslu og krøv um, at starvsfólk hava grundleggjandi førleikar í vitlíki frá 2. februar 2025. Tann 8. oktober 2025 almannakunngjørdi ES nevndin sína "Apply AI Strategy". Hetta er eitt beinleiðis trýst fyri at gera praktiska nýtslu lættari, serliga hjá smærri felagsskapum. Samstundis byggir ES upp felags orku innan vitlíki. Tey hava víðkað netverkið av vitlíkisverksmiðjum (AI Factories) til 19 støð í 16 limalondum. Samanlagt hava ES og luttakandi EuroHPC lond sett yvir 2,6 milliardir evrur av til AI Factories- og Antennas-átakið. Stutt sagt, so er talan um felags undirstøðukervi og stuðul til at hjálpa felagsskapum at menna, royna og brúka vitlíki á ábyrgdarfullan hátt.

Boðskapurin er greiður. Reglugerðirnar verða verandi, men ábyrgdarfull nýtsla verður gjørd lættari í verki. Kappingarføri trýstir eisini upp á fyri at einfalda rættartrygdina og minka um umsitingarligu byrðuna, sjálvt um ES heldur fast í høvuðstíðarætlanini fyri vitlíkislógina. Felags íløgur gera tað lættari hjá smærri felagsskapum at vera við. Skipað royndarumhvørvi (Supervised Test Environments) undir vitlíkislógini virka ikki sum ein forðing í reglunum. Tey eru stýrd umhvørvi, har felagsskapir kunnu royna loysnir, læra og skjalfesta, hvat er trygt og lógligt.

**Hví hetta hevur týdning fyri okkum.** Vit eru ikki í ES, men okkara veitarar, samstarvspartar og skipanir eru merktar av ES reglum. Um vit ikki menna okkara egnu, einføldu, tjóðskaparligu mannagongdir, so koma vit at standa eftir við ES krøvum, sum vit ikki megna at handfara á ein samskipaðan hátt tvørtur um almenna geiran.

Hetta er sera viðkomandi fyri okkum. Í verkstovunum greiddu luttakarar frá, at tey sótu føst, tí tey manglaðu greiðar og góðkendar hættir at arbeiða. Heildarætlanin skal framleiða einfaldar

rakstrarreglur, standardskabelónir og eina miðsavnaða hjálpartænastu, sum ger lógliga nýtslu praktiska.

## New Nordics AI: Hví partalag hevur týdning fyri eitt lítið mál

Tann 22. oktober 2025 stuðlaði Norðurlendska Ráðharraráðið setanina av New Nordics AI, ein norðurlendskur baltiskur depil við 30 mió. DKK í byrjanarjáttan yvir trý ár. Hann er stovnaður av tjóðskaparligum vitlíkisstovnum úr Danmark, Finnlandi, Noregi, Íslandi og Svøríki, við væntaðari luttøku úr Baltikum. Depilin hevur til endamáls at minka um dupult arbeiði, flyta seg skjótari saman, og byggja felags tól og hættir, sum smærri lond kunnu endurnýta.

Tann fyrsta týdningarmikla raðfestingin er mál. Tann 29. oktober 2025 samtyktu norðurlendsku mentamálaráðharrarnir at fíggja eitt norðurlendskt netverk fyri málmyndlar til vitlíki fyri at tryggja, at málini í økinum verða stuðlað í framtíðar vitlíkistólum. Hetta netverkið er ein av fyrstu ítøkiligu uppgávunum knýtt at New Nordics AI.

**Hví hetta hevur týdning fyri okkum.** Tað er ikki neyðugt hjá okkum sjálvi at byggja alt, sum skal til fyri at styrkja føroyska málið í tøkni. Heildarætlanin eigur at innihalda eitt ítøkiligt átak fyri at knýta okkum í tey norðurlendsku baltisku samstørvini, sum hava størst virði fyri okkum, herundir málsligt tilfeingi, felags hættir og lærdóm um rættartrygd. Føroyar hava longu sess í MR-DIGITAL. Tað, sum tørvur er á, er ein greið kós, so vit í Føroyum vita, hvat okkum tørvar og hvat vit kunnu veita í slíkum samstørvum.

Okkara verkstovur vístu ferð eftir ferð, at málsligur førleiki ikki er valfríur. Tað er grundleggjandi fyri javnbjóðis atgongd og framhaldandi nýtslu av føroyskum sum mál í yrkisligum høpi. At melda seg inn í norðurlendska málsamstarvið er eitt praktiskt stig føroyska málinum at frama. Vit eiga eisini at viðurkenna, at føroyskir granskarar longu luttaka í norðurlendskum og baltiskum vitlíkisarbeiði gjøgnum altjóða stuðul. Tað er virðismikið. Men tað styrkir ikki sjálvvirkandi føroyskan málstuðul í okkara almennu tænastum. Okkum tørvar enn eina málrættaða strategi fyri, hvat vit gera við økið, og heildarætlanin er har, vit leggja hana.

## USA: At skilja hvaðani tólini koma

USA virkar á einum heilt øðrum mátistokki. Mátitalið Stanford's AI Index 2025 (við tølum frá 2024) vísir, at stovnar í USA framleiddu 40 týðandi vitlíkismyndlar, samanborið við 15 úr Kina og 3 úr Evropa. Reuters metir, at í 2024 hava íleggjarar lagt næstan 1,6 trilliardir dollarar í vitlíki síðan 2013, og forsagnirnar hjá Reuters fyri 2025 leggja umleið 375 milliardir dollarar afturat. Lærdómurin fyri okkum er ikki at herma eftir hesum. Lærdómurin er at viðurkenna, at nógv tól, vit fara at brúka, eru myndað av hesi vistskipan.

**Hví hetta hevur týdning fyri okkum.** At vera ein varin brúkari av globalum tólum krevur greiðar innkeypsreglur, greiðar reglur fyri handfaring av dátum, og góðkend tól við tryggum arbeiðsháttum. Okkara verkstovur vístu, at nýtslan av vitlíki longu spjaðist ójavnt, eisini óformlig og ikki góðkend nýtsla, tá ið ongin tryggur møguleiki finst. Luttakarar eftirlýstu greiðari vegleiðing um, hvørjar dátur kunnu skrásetast, hvørji amboð eru trygg, og hvør kann góðkenna nýtslu. Heildarætlanin skal leggja eina ætlan fram um, hvussu vit venda óformligari nýtslu til góðkenda nýtslu, og hvussu vit fáa trygg tól í hendurnar á teimum, sum kunnu fáa gagn av teimum.

## Hitt breiðara norðurlendska mynstrið: frá strategi til veruleika

Tvørtur um Norðurlond flyta londini seg frá strategiskjølum og royndarverkætlanum til praktiska fremjan. Tey byggja teir partarnar, sum gera nýtsluna veruliga: Felags hættir at seta tól í verk í almenna geiranum, endurnýtiligar skabelónir, skipað royndarumhvørvi, skipaðar førleikaætlanir fyri almenn starvsfólk, og greiðari hættir at arbeiða við viðkvæmum dátum.

Felagsnevnarin er ikki, at tey eru liðug. Tað eru tey ikki. Men tey hava bygt eina veitingarskipan. Hetta ger politiskar avgerðir til veruleika.

**Hví hetta hevur týdning fyri okkum.** Forkanningin gevur okkum eitt haldgott grundarlag. Men ein forkanning er ikki verksetan. Næsta stigið er at byggja okkara egnu verksetanarætlan gjøgnum heildarætlanina: Greið ábyrgd, ein felags stuðulstænasta, standardskabelónir, ein einføld tilgongd til at góðkenna nýtsluføri, og royndarverkætlanir, sum taka umsitingarligar byrður úr hondunum á økjum, har trýsti á tænastufólkið er stórt.

Okkara verkstovur váttaðu hetta. Áhugapartar eftirlýstu greiðar reglugerðir, felags stuðul og skjótari royndarverkætlanir. Veitarar søgdu okkum, at teir bíða eftir einum greiðum almennum tekni, áðrenn teir gera íløgur. Uttan tað teknið stendur vistskipanin í stað.

Ongin av okkara norðurlendsku javnlíkum hevur eina passiva tilgongd til vitlíki. Tey tillaga tað aktivt við tjóðskaparligum strategium, dagførdum raðfestingum og fíggjaðum verksetingarátøkum. Føroyar kunnu antin tillaga vitlíki á okkara egna máli, í okkara tænastum og við okkara reglum, ella góðtaka, at onnur seta treytirnar fyri okkum. Vinningurin við at einki gera er lítil. Váðin fyri sundurskildari nýtslu og skaða, sum kundi verið sloppið undan, er stórur.

# Fylgiskjal 3. Átakslisti

Her er ein listi við átøkum, ið bæði luttakarar og altjóða dømi stuðla undir.

## 1. Deiling og savnan av miðladátum til venjing av vitlíki

Gera greiðar avtalur, so miðlasøvn kunnu brúkast til at menna føroyskt vitlíki, samstundis sum rættindi og álit verða vard.

- **Verkstova**: Etikkur og ábyrgd
- **Sitat**: "Í Noregi hava tey avtalu um, at alt tilfar, sum NRK ger, verður givið til vitlíkisfyritøkurnar at venja við."
- **Altjóða dømi**: Noreg (ein ítøkilig og alment kunngjørd loyvisavtala er gjørd, har norska tjóðbókasavnið fær atgongd til norskt tíðindablaðtilfar (eldri enn eitt ár) fyri at venja norsk og samisk mál- og vitlíkistøkni; á verkstovuni varð hetta sett í samband við NRK, men skjalprógvaða avtalan snýr seg um bløð og tjóðbókasavnið).

## 2. Menning av føroyskum vitlíkismyndlum

Brúka tjóðarsøvn til at byggja eitt sterkt føroyskt vitlíki, sum almenni geirin og vinnan kunnu endurnýta.

- **Verkstova**: Føroyskt fyrst og fremst
- **Sitat**: "Eitt dømi: Tjóðbókasavnið í Noreg ger størsta myndilin."
- **Altjóða dømi**: Noreg (Tjóðbókasavnið sum burðarás fyri mál og vitlíki).

## 3. Ókeypis skeið í vitlíkisfatan fyri øll

Eitt ókeypis og einfalt skeið, so fólk kunnu brúka vitlíki trygt og við sjálvsáliti í gerandisdegnum og til arbeiðis.

- **Verkstova**: Fatan og førleikar
- **Sitat**: "'Elements of AI', ókeypis netskeið í vitlíki úr Finnlandi. Kundi verið eftirlíknað í Føroyum."
- **Altjóða dømi**: Finnland ("Elements of AI" sum grundleggjandi skeiðsmyndil).

## 4. Beinleiðis fólkaræðislig faktakanning

Vitlíki, ið kann hjálpa við at kanna haldføri undir beinleiðis kjakum og sendingum fyri at minka um falskunning og økja um álitið.

- **Verkstova**: Etikkur og ábyrgd
- **Sitat**: "Factiverse: Ment í Lund (Svøríki). Ger at man t.d. í stundini til ein valfund hevði havt eina reyða lampu við hvønn luttakara, sum fór at lýsa, um hesin luttakarin lýgur. Hetta er longu ment í Svøríki."
- **Altjóða dømi**: Noreg (Factiverse er eitt norskt felag; Á verkstovuni varð tað bólkað undir „Svøríki/Lund", men felagið upplýsir sjálvt, at tað hevur høvuðssæti í Noregi og samstarvar millum annað við lærda háskúlan í Stavanger).

## 5. Stovna eitt alment dátu- og vitlíkisetiskt ráð

Ein varandi bólkur, sum veitir ítøkiliga ráðgeving og setur karmar, so nýtslan av vitlíki verður rættvís, trygg og støðug.

- **Verkstova**: Etikkur og ábyrgd
- **Sitat**: “Man átti at havt eitt dátuetiskt ráð.”
- **Altjóða dømi**: Dataetisk Råd í Danmark.

## 6. Miðsavnaður tjóðardátugrunnur

Ein felags mannagongd til at finna og endurnýta týðandi dátusøvn, so vitlíki veruliga kann arbeiða við álítandi, føroyskum dátum.

- **Verkstova**: Kappingarfør vinna
- **Sitat**: “Føroyar skulu samstarva um dátur. Ein dátubanki.”
- **Altjóða dømi**: Estland (sterk tjóðarsiðvenja fyri endurnýtslu av dátum og felags dátugrundvøllur).

## 7. Vitlíkisreglur um upphavsrætt

Greiðar reglur fyri starvsfólk um, hvat tey kunnu leggja upp ella brúka í vitlíkisamboðum, so upphavsrætturin hjá skapandi fólkum verður virdur, og váðin minkar.

- **Verkstova**: Etikkur og ábyrgd
- **Sitat**: “Okkara boð til landsstýrisfólkini er: Tryggja, at virkir, stovnar og brúkarar annars av vitlíki, kenna til og virða lóg um upphavsrætt. Mælið til, at fyritøkur, stovnar o.s.fr. orða ein vitlíkispolitikk ella mannagongd, sum ger greitt, hvussu eigur at verða farið fram, tá ið tilfar verður nýtt/lagt upp í vitlíki og somuleiðis hvørji atlit skulu takast, tá ið ein nýtir tilfar úr vitlíki.”
- **Altjóða dømi**: Svøríki og Danmark (Digg/IMY og Digitaliseringsstyrelsen mæla almenna geiranum til at seta greiðar innanhýsis leiðreglur um, hvat starvsfólk kunnu leggja inn í vitlíkisamboð, og hvussu tað, sum amboðið skapar, kann verða brúkt - við atliti til upphavsrætt og onnur rættindi).

## 8. Sjálvvirkandi teksting og umseting so hvørt

Vitlíki, sum ger talu til føroyskan tekst (og umsetingar) fyri at gera tilfarið betur atkomuligt og styrkja tað føroyska málið talgilt.

- **Verkstova**: Kappingarfør vinna
- **Sitat**: “Alt sjónvarp og video var tekstað á føroyskum.”
- **Altjóða dømi**: Bretland (UK Parliament hevur innført beinleiðis teksting av fundum í undirhúsinum og yvirhúsinum, sum kann tendrast í stroymingini).

## 9. Vitlíki at standa móti haldførisavbjóðingum

Vitlíki kann taka nógv av tí afturvendandi arbeiðinum - svara vanligum spurningum hjá borgarum alt samdøgrið, hjálpa at fylla út umsóknir og gera grovarbeiði í málsviðgerð (lesa skjøl, finna reglur,

gera uppkast). Tað frígevur tíð hjá starvsfólkum til tað, sum krevur menniskjaliga meting og hjálp - og minkar bíðitíðir, so vit fáa meira burtur úr teimum fáu hondunum (haldføri).

- **Verkstova**: Føroyskt fyrst
- **Sitat**: “Vitlíki kann hjálpa væl til at loysa haldføristrupulleikan. Komið í gongd!”
- **Altjóða dømi**: Danmark - Storskalaprojekter

## 10. Vitlíkisstýrd persónligt medisin og sjúkugreining

Vitlíki, ið hjálpir at finna mynstur í heilsudátum fyri at tryggja skjótari sjúkugreining og betri málrættaða viðgerð.

- **Verkstova**: Etikkur og ábyrgd
- **Sitat**: “Persónlig medisin, har genetiskar dátur kunnu brúkast sum amboð til at diagnostisera og viðgera sjúklingar. Í dag hava vit nógvar dátur, men trupulleikin hevur verið at finna mynstur í hesum dátum. Tað kann vitlíki helst loysa.”
- **Altjóða dømi**: Finnland (trygg nýtsla av heilsu- og almannadátum, sum vit kenna frá Findata).

## 11. Sjálvvirkandi umsiting í almenna geiranum

Sjálvvirkni í afturvendandi málsviðgerðum (loyvi, umsóknir, eftirlit), so borgarar fáa skjótari svar, og starvsfólk brúka minni tíð upp á rutinuarbeiði.

- **Verkstova**: Kappingarfør vinna
- **Sitat**: “Meira sjálvvirkandi viðgerðir, til at fáa byggiloyvi og annað.”
- **Altjóða dømi**: Danmark (umfatandi ætlanir í almenna geiranum umfata sjálvvirkandi málsviðgerð).

## 12. Gjøgnumskygni í almennum útreiðslum

Ein tænasta á gerandismáli, har tú kanst "spyrja fíggjarlógina", so tað verður lættari hjá borgarum at skilja, hvar pengarnir fara, og hvat teir fíggja.

- **Verkstova**: Etikkur og ábyrgd
- **Sitat**: “Í vælferðarsamfelagnum verður altíð settur spurningur við, hvar pengarnir fara; kann vitlíki hjálpa við at lýsa, hvat hvør króna fer til?”
- **Altjóða dømi**: Nigeria (BudgIT - “Bimi”): Ein vitlíkis-hjálpari, har borgarar kunnu spyrja á gerandismáli um fíggjarlóg, útreiðslur og almennan fíggjarpolitikk og fáa skjót, skiljandi svar grundað á almennar fíggjardátur (t.d. játtanir, inntøkur og útreiðslur).

## 13. Dagføring av upphavsrættarlógini til menning av vitlíki

Greiða og dagføra reglurnar, so tað er greitt, hvat er loyvt, tá ið føroyskt vitlíki verður ment, samstundis sum rættindahavarar verða vardir.

- **Verkstova**: Føroyskt fyrst og fremst
- **Sitat**: “Dagførið lóggávu, so føroyskt vitlíki lættari kann mennast. Nógvar avmarkingar eru í upphavsrætti, sum eisini skal virðast. Fíggið arbeiði í vitlíki.”

- **Altjóða dømi**: Danmark/Noreg (karmar sum "sandkassar" og formlig vegleiðing vísa í verki, hvat er loyvt, tá ið nýggj tøkni kemur).

## 14. Strategiskt samstarv við stórar tøknifyritøkur

Formlig samstørv, ið tryggja, at føroyskt verður tøkt í teimum vitlíkisamboðum, sum fólk veruliga brúka, heldur enn at verða gloymt burtur.

- **Verkstova**: Føroyskt fyrst og fremst
- **Sitat**: “1) Fáa samband við tøknifyritøkur, ið mynda økið, og fáa avtalu í lag um, at føroyskt er partur av skipanunum, vit brúka í Føroyum. 2) Raðfesta økið fíggjarliga, eitt nú við øktari játtan til Máltøknidepilin og eftirútbúgving av lærarum.”
- **Altjóða dømi**: Wales (samstarvsleistur millum smá mál og veitarar av málmyndlum).

## 15. Vitlíki í námsætlanum og eftirútbúgving av lærarum

Undirvísa næmingum og eftirútbúgva lærarar, so vitlíki verður ein natúrligur førleiki, og fólk tíðliga læra ábyrgdarfulla nýtslu.

- **Verkstova**: Fatan og førleikar
- **Sitat**: “Tøknifatan átti at verið ein lærugrein.”
- **Altjóða dømi**: Estland (vitlíki í skúlum og átøk innan tjóðarútbúgving).

## 16. Umhvørvisvinaligar og burðardyggar vitlíkisloysnir

Brúka vitlíki til at minka um burturkast og útlát við betri ætlanlegging og snildari rakstri, ið byggir á veruligar dátur.

- **Verkstova**: Etikkur og ábyrgd
- **Sitat**: “Finna burðardyggar orkuloysnir = minni dálking (umhvørvisetikkur).”
- **Altjóða dømi**: Finnland (orkustýringarroyndir í Helsinki sum fyrimynd).

## 17. Tjóðar-leitiskrá fyri føroyskt tilfar

Ein skrá, sum ber til at leita í yvir alment fíggjað føroyskt tilfar, so fólk (og vitlíkisamboð) skjótt kunnu finna álítandi føroyska vitan.

- **Verkstova**: Føroyskt fyrst og fremst
- **Sitat**: “Atgongd til at leita í ØLLUM føroyskum tilfari.
    - Eitt yvirlit (index) yvir alt, sum er framleitt við almennum pengum.
    - Gera eina føroyska vitanargoymslu, har atgongd er til eina stóra mongd av føroyskum tilfari.
    - Kann gera, at mentanin verður vand inn í vitlíkismyndlar.
    - Eitt amboð til at berjast ímóti falskunning.
    - Tað fer at noyða okkum at miðla á annan hátt.”
- **Altjóða dømi**: Estland (skráskipanir sum RIHA og hjálparforrit, sum krevja, at tilfar er lætt at finna).

## 18. Fíggingarskipan við avgjaldi á KT-verkætlanir

Set av ein lítlan part av fíggjarkarminum í øllum KT-verkætlanum fyri at fíggja felags vitlíkisamboð yvir tíð (dátur, málsligt tilfar, tryggar uppsetingar).

- **Verkstova**: Fatan og førleikar
- **Sitat**: “Hugskot: Ein ávísur prosentpartur (1-2%) av øllum KT-verkætlanum kundi farið til at fíggja eitt vitlíkisundirstøðukervi.”
- **Altjóða dømi**: Danmark (miðvís tjóðarfígging av stórum almennum vitlíkisátøkum).

## 19. Alment vitlíkisstýri

Ein almennur stovnur, sum ásetur felags standardir, amboð og stuðul, so vitlíkisarbeiðið verður samskipað og kann endurnýtast tvørtur um almenna geiran.

- **Verkstova**: Føroyskt fyrst og fremst
- **Sitat**: “Stórar fíggjarligar íløgur í gransking og menning av føroyskum vitlíki. Almennur stovnur: 'Vitlíkisstýrið'.”
- **Altjóða dømi**: Danmark (miðsavnaður leistur fyri útbreiðslu av vitlíki í almenna geiranum).

## 20. Tjóðarroyndarstova fyri vitlíki

Eitt felags stað at royna hugskot trygt við veruligum avbjóðingum, læra skjótt og endurnýta tað, sum riggar tvørtur um stovnar.

- **Verkstova**: Kappingarfør vinna
- **Sitat**: “Skal man veruliga flyta eitt stig upp, má Fróðskaparsetrið takast við. Eitt felags stað at gera royndir við vitlíki, sum man skal hava menning innan AI. Í samstarvi við onnur fróðskaparsetur og fyritøkur.”
- **Altjóða dømi**: Svøríki (samstarv líkt "AI Sweden" og felags amboð).

## 21. Trygg vitlíkisarbeiðsumhvørvi til viðkvæmar dátur

Góðkend stongd umhvørvi, har starvsfólk kunnu brúka vitlíki til viðkvæmar dátur, uttan at tær fara úr vardum skipanum.

- **Verkstova**: Etikkur og ábyrgd
- **Sitat**: “Aðrastaðni brúkar man vitlíki nógv meira aktivt. Avtalur verða gjørdar við Microsoft til dømis, sum veita stongd umhvørvi til privatar dátur.”
- **Altjóða dømi**: Finnland (karmar og mannagongdir kring Findata sum fyrimynd fyri trygga nýtslu av viðkvæmum heilsu- og almannadátum í “stongdum” umhvørvum.)

## 22. Reglugerðarligur sandkassi og greið góðkenningartilgongd

Ein praktiskur máti at fáa "ja, um…" svar: Hvat er loyvt, hvørji eftirlit krevjast, og hvør kann góðkenna.

- **Verkstova**: Kappingarfør vinna
- **Sitat**: “Tíð, pengar og reglugerðir eru størstu forðingarnar. Hvør kann góðkenna?”

- **Altjóða dømi**: Danmark og Noreg (sandkassar, sum eru knýttir at teimum, ið gera reglugerðirnar).

## 23. Felags talgildur hjálpari til almennar tænastur

Ein felags hjálpari, sum hjálpir starvsfólkum (og seinni borgarum) at finna kunning, gera upprit og finna runt í tænastum - mentur eina ferð og síðan endurnýttur.

- **Verkstova**: Kappingarfør vinna
- **Sitat**: "Persónligur AI-ráðgevi, frá vøggu til grøv."
- **Altjóða dømi**: Svøríki (Svea-hjálparin sum ein longri tænastumyndil) og Estland (hjálparforrit og sterk skrásetingarsiðvenja).

## 24. Talgilding av mentanararvi og rættindagreining

Fíggja talgilding, reinsing og rættindakanning av mentanartilfari, so tað trygt kann endurnýtast í útbúgving, tænastum og málamboðum.

- **Verkstova**: Føroyskt fyrst og fremst
- **Sitat**: "Pengar til talgilding av mentanararvinum."
- **Altjóða dømi**: Noreg/Ísland (mál og mentanardátur verða viðgjørdar sum varandi alment undirstøðukervi).

## 25. Standardir fyri dátugóðsku og dátulýsing

Felags reglur fyri dátugóðsku og greiðar lýsingar (ognarskapur, endamál, nyttuleiki), so vitlíki verður meira álítandi og betur egnað til endurnýtslu.

- **Verkstova**: Føroyskt fyrst og fremst
- **Sitat**: "Vitlíki er góður tænari, men ringur harri. Minnist til góðskutrygging av dátum."
- **Altjóða dømi**: Estland (dátur í fyrstu røð og góðskutryggjaðar skráir sum treyt).

## 26. Vitlíkisroyndarstova í bláa búskapinum til fiskivinnu og aling

Felags royndarverkætlanir og dátusøvn í fiski- og alivinnuni, so vitlíki kann betra um frágreiðingar, eftirlit, ætlanarlegging og dagliga raksturin.

- **Verkstova**: Kappingarfør vinna
- **Sitat**: "Sagt verður frá møguleikanum fyri at gera forsagnir viðvíkjandi fiskivinnuni við at máta kemikaliur í vatninum. Taka meira dygdargóðar avgerðir við AI-forsøgnum."
- **Altjóða dømi**: Noreg (átøk um samsvar og frágreiðingar í fiskivinnuni úr norðurlendsku kanningini) og Japan (dømi um snildari aling).

## 27. Samsýning til rættindahavarar og loyvi til venjingardátur

Ein greiður loyvis- og gjaldsmyndil, so skapandi fólk fáa samsýning, tá ið teirra verk verða brúkt til at venja vitlíki. Hetta fremur samstarv heldur enn ósemju.

- **Verkstova**: Føroyskt fyrst og fremst

- **Sitat**: “Eg vil heita á teg um at tryggja, at rættindini til tilfarið, sum verður brúkt til at fóðra vitlíki við, verða vird, og at rættindahavarar fáa rættvísa samsýning fyri tað.”
- **Altjóða dømi**: Nýsæland (loyvis- og stýringsleistur hjá Te Hiku).

## 28. Seta eina miðsavnandi samskipandi vitlíkiseind

Ein greiður "eigari" av tvørgangandi vitlíkisarbeiði í almenna geiranum, so átøkini ganga somu leið, og felags amboð verða endurnýtt.

**Altjóða dømi**: Í grannalondunum er slíkt miðsavnandi akkershald longu ein veruleiki: Danmark hevur sett eina tvørsektorala “Digital Task Force” fyri vitlíki í almenna geiranum, Noreg hevur Digdir við felags vegleiðing og yvirliti yvir vitlíkisverkætlanir, og Finnland hevur felags leiðreglur frá Fíggjarmálaráðnum, galdandi fyri alla almennu umsiting; OECD.AI vísir eisini, at hetta er vanligt í stórum parti av heiminum (yvir 60 lond).

## 29. Almenn skrá og ávirkanarkanning av vitlíkisskipanum hjá tí almenna

Ein einføld skrá yvir almennar vitlíkisskipanir og ein grundleggjandi ávirkanarkanning undan nýtslu, fyri at stuðla undir gjøgnumskygni og álit.

**Altjóða dømi**: Bretland (ATRS og algoritmuskrá) og Kanada (leistur fyri ávirkanarkanning av algoritmum).

## 30. Norðurlendskt baltiskt samstarv um felags undirstøðukervi og vitlíkismyndlar

Brúka norðurlendskt baltiskt samstarv til at deila byggikubbar (leistar, felags amboð og málsligt tilfar), so smærri umsitingar ikki noyðast at byggja alt sjálvar.

**Altjóða dømi**: New Nordics AI og norðurlendskt baltiskt samstarvsmynstur lýst í norðurlendsku kanningini.

## 31. Felags atgongd til telduorku gjøgnum vitlíkisverksmiðjur og tjóðar-superteldur

Atgongd til kraftmikla telduorku gjøgnum felags hentleikar og samstarv, so drúgt vitlíkisarbeiði er møguligt uttan at eiga tólbúnaðin sjálvan.

**Altjóða dømi**: Finnland (LUMI AI Factory), Danmark (Gefion) og Svøríki (karmar um vitlíkisverksmiðjur sum lýst í norðurlendsku kanningini).